# Miðnámsrit

6 juni 2015

## Um blaðið

Góðu lesarar!

Í sætta Miðnámsriti eru fimm greinir. Olav og Tórður hava skrivað grein um málstríð á miðnámi nú fjøruti ár eftir tiltikna málstríðið í Hoydølum í 1975.

Gitte Klein hevur grein um m.a. talgilt undirvísingartilfar. Alt fleiri eru sannførd um, at talgildingin fer at kollvelta undirvísingarskipanina, men Gitte ivast.

Olav skrivar um næmingar og ymiskleika. Næmingar eru ikki bara ymiskir: Teir eru ymiskir á ymiskan hátt á ymiskum økjum og í fleiri dimensiónum. Henda sannroynd kann geva lærarum orsøk til sjálvrannsakan.

Vit, sum undirvísa á miðnámi hava næmingar, ið eru føddir í 1990'unum. Hetta ættarliðið verður rópt Z-ættarliðið, ið er navnið á grein, sum amerikanski granskarin Adam Renfro hevur skrivað, og sum Sólfinn Hannsen hevur týtt. Eitt av eyðkennunum hjá tí er, at tað er vaksið upp við interneti.

Seinasta greinin er viðtal, sum Tórður hevur havt við Billu Sondum, sum undirvísir í grønlendskum studentaskúla.

*Blaðstjórn: Olav Absalonsen og Tórður Johannesarson*

# Innihaldsyvirlit

**Málstríðið á miðnámi** 3

**Ávegis til talgildan demens, Gitte Klein** 8

**Næmingar og ymiskleiki, Olav Absalonsen** 20

**Z-ættarliðið, Adam Renfro, Sólfinn Hansen týddi** 32

**Viðtal við føroying á grønlendskum studentaskúla, Tórður Johannesarson** 36

# Málstríðið á miðnámi

**Í hesum døgum – í juni 2015 – eru 40 ár síðan, at 12 næmingar á Studentaskúlanum í Hoydølum ikki fingu prógv, tí teir vildu ikki skriva undir eina fráboðan, har teir góðkendu, at svarið, sum teir skrivaðu á føroyskum í próvtøkuni í samfelagsfrøði, bleiv dømt eftir einari umseting til danskt.**

Árið fyri – í 1974 – vóru tveir næmingar, ið ikki vildu tosa danskt til munnligu próvtøkuna í samfelagsfrøði, og tá ið próvdómarin, ið var settur, ikki skilti føroyskt, kundi hann ikki geva met fyri avrikið. Í 1975 var skrivlig próvtøka í samfelagsfrøði, og myndugleikarnir, sum vistu, at fleiri næmingar kravdu at sleppa at skriva á føroyskum, royndu at loysa málið. Soljóðandi skriv varð býtt út ímillum næmingarnar at skriva undir:

> *Undertegnede erklærer sig herved indforståaet med, at min besvarelse af denne opgave på færøsk bliver bedømt på grundlag af en oversættelse til dansk.*

....................................

Sum skilst, fekk hetta ikki stórvegis avleiðingar fyri tey 12, sum ikki skrivaðu undir. Fleiri av teimum tóku hægri útbúgvingar. Men eftir tær óhepnu hendingarnar í 1974 og 1975 var so stórt trýst á myndugleikunum, at hetta kundi ikki halda fram; og síðani 1976 hava næmingar á føroyskum miðnámi ótarnaðir kunnað nýtt móðurmálið til próvtøkurnar. Tað stóð ikki á at finna skikkaðar próvdómarar, sum dugdu føroyskt. Men hví skuldi uppreistur frá næmingunum til, áðrenn myndugleikarnir tóku seg saman at loysa málið?

## Miðnámsflokkurin

Hóast skúladepilin einki hevur við málstríð at gera, so er søgan um Marknagilsdepilin ikki heilt ólík málstríðnum. Hugskotið við deplinum var, at tríggir miðnámsskúlar skuldu húsast í honum, men onkursvegna fekst ikki politisk semja um hetta, og á vári í 2007 fór ein verkætlan í gongd at gera ein skúladepil við Marknagil, har Handilsskúlin og Tekniski skúlin skuldu húsast, men har Studentaskúlin ikki var við.

Í januar 2008 var løgtingsval. Tá stillaði ein nýggjur flokkur upp, ið nevndist Miðnámsflokkurin. Hann hevði eitt mál á valskránni, sum var, at allir tríggir miðnámsskúlarnir skuldu vera við í Marknagilsdeplinum. Miðnámsflokkurin slapp framat í fjølmiðlunum, og Marknagilsdepilin varð drigin upp í valstríðið. Hinir flokkarnir gjørdust so bangnir fyri

hesum nýggja flokkinum, at teir allir sum ein boðaðu frá, at teir tóku undir við, at allir tríggir miðnámsskúlarnir skuldu vera við í Marknagilsdeplinum.

Miðnámsflokkurin fekk ongan mann inn á ting; men hann hevði tvingað hinar flokkarnar at taka støðu, og so var eingin vegur aftur. Marknagilsdepilin kemur við øllum trimum miðnámsskúlunum í einum. Um tað so var ein røtt avgerð, er ein heilt annar spurningur, sum ikki skal verða viðgjørdur her.

## Enn sum áður er lítið undirvísingartilfar á føroyskum

Í fyrsta Miðnámsriti frá mars 2014 kundu vit lesa um kanning, sum varð gjørd av undirvísingartilfarinum á føroysku miðnámsskúlunum. Kanningin vísti, at 80% av tilfarinum var danskt. Tá ið kanningin kom út, vóru onkrar samrøður í útvarpinum, og onkur tók tað upp á facebook. Ein næmingur, ein lærari, stjórin á Námi og ein rektari úttalaðu seg um standin, og tey harmaðust øll. Annars valdaði tøgn – knúsandi tøgn. Eingin spurdi, hvat Mentamálaráðið, politisku flokkarnir, fakfeløgini hjá lærarum og onnur, ið vara av miðnámi, høvdu upp á hjartað í hesum sambandi. Enn hevur eingin meldað út, hvat tey ætla at gera við henda trupulleika, ið mest minnir um eina anakronismu, um vit hugsa um málstríðið fyri 40 árum síðan. Rætt skal vera rætt, Nám roynir; men stovnurin hevur sera lítla játtan, sum ikki røkkur langt.

Í sama Miðnámsriti í mars 2014 var ein onnur grein, sum vísti á, at í veruleikanum kostar tað samfelagnum einki at gera meiri føroyskt tilfar:

> *Tá ið vit tosa um, hvat loysir seg, er sostatt umráðandi at taka nyttuvirðið av føroyskum tilfari við. Um vit venda eyguni móti kostnaðarsíðuni, so kostar tað at gera eina bók. Rithøvundarnir skulu hava løn, so kemur rættlestur, sniðgeving, perma, myndir, umbróting, prentumsiting og annað. Men alt arbeiðið er í landinum, og vit halda lív í fleiri virðismiklum fakum. Lærubókarithøvundar eru ofta lærarar, sum vita og hava eina meining um, hvussu ein lærubók skal leggjast til rættis. Fakliga er hetta sera mennandi, og tað er gott fyri skúlan og fyri samfelagið.*
>
> *Í pengarenslinum (búskaparligu ringrásini) fara pengarnir av einari føroyskari bókaútgávu úr einum búskaparligum geira í annan. Um Nám gevur bókina út og fíggjar hana, fara pengarnir í fyrstu atløgu úr landskassanum sum løn og gjald til fyritøkuna, ið ger bókina, sum aftur rindar starvsfólkum sínum løn. Øll hesi gjalda skatt av innkomuni og avgjald, tá ið pengarnir verða brúktir; hesin partur kemur innaftur í landskassan. Tá ið næmingarnir keypa bókina, kemur nakað innaftur tann vegin. Beinleiðis innflutningur er næstan eingin. Fyri at tryggja nyttuna av føroyskum skúlabókum átti søluprísurin at verið hildin lágur, tí tað kostar*

*samfelagnum einki; tað er bara eitt gjald frá húsarhaldum til forlagið, og lægri prísurin er, fleiri fáa nyttu av bókini.*

*Men velja vit í staðin at keypa útlendskar lærubøkur, fer allur peningurin beinleiðis av landinum. Vit missa ikki bara tað. Evnarík fólk í landinum sleppa ikki at menna síni evni at skriva ella gera annað arbeiði, ið hoyrir til eina bókaútgávu, og næmingarnir fáa ikki bøkur, sum eru skrivaðar til teirra.*

## Nøkur uppgávusett eru framvegis á donskum

Vit kunnu spyrja, hvussu málsliga støðan er inni í flokshølunum nú á døgum. Næmingar tosa føroyskt í skúlastovunum, og skulu í flestu førum upp til próvtøku, har teir sleppa at brúka móðurmálið; men enn eru nøkur uppgávusett á donskum í føroysku miðnámsskúlunum. Vit kunnu nevna danskt A og støddfrøði A og B og so nakrar lærugreinir, ið sera fáir næmingar hava: franskt A, spanskt A, týskt A, latín A, tøknifrøði B, alisfrøði A, evnafrøði A, lívfrøði A og tónleik A. Tað vil siga, at lærari og næmingar tosa eitt mál í flokshølunum, men næmingarnir fáa uppgávur á fremmanda máli, ið eru ætlaðar til næmingar í øðrum landi, tá ið teir skulu upp til skrivliga próvtøku í nevndu lærugreinum. Hetta samsvarar illa við nútímans námsfrøði, og próvtøkan verður tískil minni eftirfarandi og minni álítandi.

## Námsfrøðiliga útbúgvingin er á donskum – eisini verkligi parturin

Lærarar á føroysku miðnámsskúlunum skulu taka námsfrøðiliga útbúgving. Í Miðnámsriti í september 2014 eru tvær greinir um hesa námsfrøðiligu útbúgvingina (stytt NÚ). Seinastu árini síðani 1999 hava lærarar úr Danmørk (Syddansk Universitet) undirvíst føroyskum miðnámslærarum. Har verður undirvíst á donskum, og tað kemur fyri, at kravt verður, at kjak ímillum føroyskar lærarar skal vera á donskum, tí at tey, sum standa fyri NÚ ikki skilja føroyskt, og tískil verður kjakið skert, stirvið og deydligt.

Sjálvt um vit hava føroyskar lærarar á Fróðskaparsetri Føroya, ið kunnu undirvísa á ástøðiliga partinum, so letur Mentamálaráðið fólk undirvísa, ið ikki skilja føroyskt. Hetta má tulkast soleiðis, at Mentamálaráðið ikki hevur álit á einum stovni undir ráðnum. Tað harmiliga í øllum hesum er, at eingin ger vart við støðuna. Eingin talar at alment, hvørki kandidatar, fakfeløg hjá miðnámslærarum ella skúlaleiðslurnar – aftur knúsandi tøgn.

Sum partur av námsfrøðiligu útbúgvingini skulu lærarar undirvísa í 10 vikur á einum fremmandum skúla. Í hesum sambandi eru 95% av føroysku lærarunum noyddir at fara til Danmarkar ella annað land at taka tann verkliga partin í námsfrøði, tí at Mentamálaráðið krevur tað. Her skulu føroyskir lærarar læra at undirvísa útlendskum næmingum á

fremmandum máli fyri at vera førir fyri at undirvísa føroyskum næmingum á føroyskum í Føroyum, hóast øll áttu at vitað, at í námsfrøði er málið tað týdningarmesta amboðið.

Á sumri 1999 kunngjørdi landsstýrismaðurin eina kunngerð um námsfrøðiliga útbúgving fyri lærarar í vinnuskúlum og miðnámsskúlum. Við hesum tók Undirvísingar- og mentamálastýrið studentaskúlalærararnar við í eina felags námsfrøðiliga útbúgving. Hugskotið at hava eina námsfrøðiliga útbúgving fyri allar lærarar á miðnámi og yrkisnámi er helst grundað á, at tað skal vera smidligt at flyta ímillum skúlar ella at undirvísa í fleiri skúlaformum. Sæð við handilsskúlaeygum var tó eitt afturstig við hesi avgerð, tí nú var tað ikki longur eitt krav, at um tú skuldi undirvísa á Handilsskúlanum, so skuldi tú hava eina grundútbúgving í búskapi, handilsskapi og løgfrøði, sjálvt um tú undirvísti í máli ella søgu. Hetta hevði verið ein partur í handilsfaklæraraútbúgvingini, tí í Handilsskúlanum er tvørfaklig undirvísing og tvørfaklig læring gomul siðvenja. Og hetta hendir í eini tíð, har myndugleikarnir samstundis krevja meiri tvørfakliga undirvísing í skúlaverkinum. Niðurstøðan av hesi óhepnu tilgongd er, at høgra hond veit ikki, hvat vinstra ger.

Í 2002 kom nýggj kunngerð frá Mentamálaráðnum, sum tað nú æt. Hvørki kunngerðin frá 1999 ella tann frá 2002 siga nakað um, at verkligi parturin ikki skal vera í Føroyum. Kortini hevur Mentamálaráðið við skiftandi landsstýrismonnum og –kvinnum havt tann politikk, at so at siga allir lærarar skulu av landinum at taka verkliga partin (føroysk-lærarar undantiknir). Tað paradoksala í hesum er, at so leingi vit høvdu eina skipan eftir donskum reglum, virdu danskir embætismenn og –kvinnur í SEL (statens erhvervs-pædagogiske læreruddannelse), at vit vóru føroyingar, og at undirvísingarmálið í Føroyum er føroyskt. Men so skjótt, sum vit fingu føroyska kunngerð á økinum, kundi verkligi parturin ikki takast í Føroyum longur, men lærarar, sum skulu undirvísa í føroyskum skúla, skulu av landinum at taka verkliga partin á einum fremmandum máli og í fremmandum umhvørvi. Lærarar í hópatali hava latið sær hetta lynda, meðan fakfeløgini hjá teimum ikki lata við seg koma, og politiska skipanin letst ikki um vón.

## At fáa virði fyri pengar

Eitt orðafelli í búskapi er spurningurin um at fáa virði fyri pengar. Tað sipar til, at tá ið av-gerðir skulu takast um at keypa eina vøru ella tænastu, so skal hon (vøran ella tænastan) ikki kosta meira enn tað, sum nyttuvirði á henni er fyri keyparan, ið kann vera privat-persónur, fyritøka, land ella kommuna. Hetta er sama hugsan, sum vit kenna frá cost-benefit metingum. Tá ið landið og kommunur brúka pengar til skúlar, havnir, vegir ella heilsuverk, so er tað ein meting um, at vit fáa nyttu fyri pengarnar, sum er meiri enn tað, sum tað kostar.

Um vit brúka henda hugsanarhátt til politikkin hjá Mentamálaráðnum at senda næstan allar miðnámslærarar av landinum at taka verkliga partin í námsfrøði, so kunnu vit um kostnaðarsíðuna siga, at hetta er sera dýrt. Lærarin skal hava fulla løn, meðan hann er burtur, og tað almenna skal eisini gjalda uppihaldið hjá honum og løn til avloysara. Men tað er ikki bara dýrt fyri landskassan. Summir av lærarunum hava børn í barnagarðsaldri ella skúlaaldri, og tað er ikki bara sum at siga tað hjá øllum at fara av landinum í 10 vikur. Hetta er eisini dýrt fyri samfelagið sum heild. Hyggja vit at inntøkusíðuni, sum her svarar til nyttuna av verkliga partinum, er hetta virðið sera ivasamt. Lærarin skal undirvísa útlendskum næmingum á fremmandum máli, og tað líkist ikki akkurát teimum umstøðum, sum hann skal undirvísa undir, tá ið hann kemur heimaftur. Politikkurin at senda miðnámslærarar av landinum at taka verkliga partin stendur seg tískil illa í einari cost-benefit meting: Tað kostar nógv, og nyttan er lítil.

## Hvat skal til at venda gongdini?

Øll, ið vara av miðnámi, eru noydd at seta seg niður og orða okkurt slag av visjón, hvat ið vit ætla við miðnámsskúlunum. Her skulu átøk til, sum bøta um málsligu støðuna, her skal umframt visjón eisini aktión til. Vit kundu lært av málstríðnum hjá studentunum.

Um politiski myndugleikin ikki vaknar, so mugu næmingar purra út. Vit hava sæð, at tað hjálpir, tá ið næmingar taka seg saman at mótmæla – málstríðið í Hoydølum er eitt av mongum fordømum, og Miðnámsflokkurin er eitt annað.

# Ávegis til talgildan demens

Gitte Klein

**Alt fleiri eru sannførd um, at talgildingin fer at kollvelta undirvísingarskipanina. Men er nakað nýtt undir sólini? Kann talgildingin nakað, sum góð næmingalagað undirvísing ikki kann? Og hvussu er við børnum og ungum, sum eru royndarkaninir í eini tøkniligari ringrás, sum eingin kennir avleiðingarnar av?**

Børn og ung vaksa upp í einum øðrvísi veruleika enn undanfarin ættarlið. Teirra gerandisdagur er merktur av skermum av øllum handa slagi. Meðan undanfarin ættarlið savnaðust rundan um ein stóran sjónvarpskassa miðskeiðis í uppihaldsrúminum, eru skermarnir seinastu árini vorðnir minni og minni í vavi, eins og felagsskapurin framman fyri skermin er skiftur út við einstaklingar, sum hvør í sínum lagi sita við egnum skermi. Mann er líkasum sundur saman.

Kanningar úr Danmark vísa, at børn í meðal nýta 7 tímar og 17 minuttir um dagin framman fyri skermi teir dagar, tey hava frí. Skúladagar sita tey bert 5 tímar og 23 minuttir framman fyri skerminum, og her er tað ikki tikið við, at næmingar eisini brúka skerm í skúlatíðini. Granskarar meta, at nýtslan bara fer at økjast komandi árini (Politiken, 13. okt. 2012).

Vit hava ikki gjørt somu kanning í Føroyum, men Dátueftirlitið hevur kannað atgongd til netið hjá børnum og ungum, og hon vísir, at børn í Føroyum hava betri atgongd til netið enn donsk børn, (www.datueftirlitið.fo) og tí kann væntast, at føroysk børn nýta minst líka nógva tíð sum tey donsku børnini.

Sambært British Medical Journal hava næmingar, sum fara í fyrsta flokk eftir summarfrítíðina, nýtt eitt heilt ár av lívinum framman fyri skermi. Hetta er veruleikin, sum alt kjak skal taka støði í, tá tosað verður um, hvørt næmingar skulu hava fría atgongd til talgildar miðlar í skúlatíðini. Givið er, at lættari atgongd tú hevur til talgild amboð, størri eru sannlíkindini fyri, at tú brúkar tey meira.

Seinastu tíðina hava alt fleiri skúlar gjørt stórar íløgur í teldlar til næmingar. Í Stranda skúla og Tórshavnar Kommunuskúla hevur hvør næmingur fingið egnan teldil. Í Stranda skúla rinda foreldrini ein part, meðan foreldur at næmingum í Tórshavnar Kommunuskúla rinda eitt depositum á 50 krónur. Ætlanin er, sambært heimasíðuni hjá Stranda

skúla, at motivera næmingar at læra, at betra um læringina hjá teimum og fyrireika teir til eina framtíð, har tøknin hevur avgerandi leiklut.

Íløgurnar eru stórar, men umframt byrjanarútreiðsluna, skal skúlin rokna við stórum útreiðslum til viðlíkahald. Odder kommuna, sum hevur givið øllum fólkaskúlanæmingum teldil, nýtti fyrsta árið 420.000 krónur til viðlíkahald og umvæling av teldlunum (Christensen, 2013). Harumframt skal roknast við, at telduvørðurin fær økta arbeiðsbyrðu.

Tá ein skúli velur at gera so stórar íløgur, er tað áhugavert at hyggja eftir, hvat hann kann vænta at fáa burturúr. Spurningurin er, um næmingurin fær meira burturúr skúlagongdini við einum teldli ella ikki. Tá mann í heilivágsídnaðinum skiftir ein heilivág út við annan, verða stór krøv sett til, at nýggi heilivágurin hevur færri hjáárin enn tann gamli, umframt at hann virkar minst líka væl. Í undirvísingarhøpi er hetta ikki framferðarhátturin. Hóast eingin óheft kanning vísir, at talgildu miðlarnir elva til betri læring og betri úrslit ella hava færri hjáárin enn aðrir undirvísingarmiðlar, eru fleiri skúlar farnir undir stórar íløgur í tøkni. Allar kanningar mæla til, at mann bíðar við at gera íløgur í teldlar, tí granskingar-úrslitini benda á, at vansarnir eru fleiri enn fyrimunirnir við talgildu miðlunum, umframt at vitanin enn er alt ov lítil (Spitzer, 2011).

## Um at ræðast tað nýggja

Fyri umleið 100 árum síðani vórðu røntgenstrálurnar mentar. Røntgentól vóru tá partur av veitslum hjá teim ríku, sum stuttleikaðu sær við at taka røntgenmyndir hvør av øðrum. Handilsídnaðurin dugdi eisini at gera sær dælt av tólunum. Skuldi tú keypa barnaskógvar, skuldu føturnir myndast, tí ræðusøgur gingu um, hvat kundi henda fótunum, um barnið ikki fekk rættan skógv. Í fleiri ár lótu góðtrúgvin foreldur handilsfólk taka røntgenmyndir av børnum. Hóast gransking vísti, at strálurnar vóru vandamiklar, gingu 20 ár, áðrenn forboð varð sett fyri tólunum. Ræðslan fyri, at føturnir fingu skaða, var størri enn óttin fyri strálunum.

Sama ræðsla sær út til at gjøgnumsúrga útbúgvingarskipanina. Foreldur, lærarar og politikarar skunda undir talgildingina av fólkaskúlanum, tí mann metir, at næmingar sjálvandi skulu hava nýggjastu tøknina. Sannleikin er tó, at børnum tørvar ikki teldlar og teldur fyri at læra. Funnist verður ofta at røddum, sum onkursvegna tala at nýggjum rákum, og soleiðis er eisini, tá hugsað verður um tøkniligu menningina og nýtsluna. Hevur mann ikki altíð óttast tað nýggja? Og hevur eldra ættarliðið ikki altíð funnist at ung-dóminum? Er hetta ikki bert fanatisma og hýsterí? Er tað ikki bráðneyðugt, at børn og ung læra at nýta tøknina, so tey eru so væl fyri at møta framtíðini, sum gjørligt? Børn og ung hava ongantíð havt lættari atgongd til talgildar miðlar, enn tey hava nú á døgum, og hóast tað vísa kanningar, at tey einans duga at nýta miðlarnar til tað, sum tey brúka teir til, tað

vil siga í høvuðsheitum til sosialu miðlarnar og spøl (Bjørkeng, 2011). Hetta merkir, at hóast stórar íløgur eru gjørdar í tøkni í skúlunum, og hvørt barn veksur upp við ymiskum skermum við hondina, hava talgildu amboðini ikki flutt fjøll. Í roynd og veru eru nýtsla og evnini at handfara amboðini ikki broytt seinastu 15 árini.

## Tøkniliga ringrásin

Í 1920'árunum segði Thomas Edison í grein, at bøkur skjótt fóru at gerast fullkomiliga avoldaðar í skúlum. Orsøkina segði hann vera, at kykmyndir gjørdu tað møguligt hjá næmingum at ogna sær alla menniskjaliga vitan – bert við at hyggja. Hann spáddi, at skúlaskipanin fór at verða kollvelt næstu 10 árini.

Góð 50 ár seinni, tá fyrstu sjónvørpini komu á marknaðin, vóru nýggjar optimistiskar røddir frammi, tí gjøgnum sjónvarpið bar endiliga til at fara í hvønn krók og miðla mentan, virði og vitan, og soleiðis menna fólk á ein hátt, eingin helt vera møguligt. Fleiri skúlar gjørdu stórar íløgur í sjónvørp, millum annað skúlar í Samoa. Farið varð fram á tann hátt, at næmingar hugdu at filmum um ymisk evni, og loystu síðani uppgávur, sum høvdu við filmin at gera. Í 1968 segði forsetin Lyndon B. Johnson alment, at framtíðin lá í sjónvørpum (Oppenheimer, 2004).

Kann nevna, at royndirnar í Samoa endaðu við, at í 1972, bert fá ár eftir, at skúlar gjørdu stórar íløgur í sjónvørp, ynsktu tríggir av 4 lærarum at steðga undirvísingini við sjónvørpum, meðan 70% av miðnámsskúlalærarunum vóru ónøgdir. Nú á døgum er eingin, sum hugsar um sjónvarp sum tøkniligt undur, tá tað snýr seg um læring. Sjónvarpið verður í stóran mun nýtt sum eyka amboð at fáa tað seinasta upp á pláss ella sum gularót, tá næmingar hava loyst eina uppgávu.

Eftir stóru og kostnaðarmiklu royndirnar við sjónvørpum í skúlunum, kom tíðin til teldur, og lovaði mann nú uppaftur betri møguleikar og kollveltandi læringshættir.

Í USA nýtti man í 1990'árunum 70 milliardir dollarar til tøkniliga útgerð svarandi til 170.000 fulltíðar lærarastørv. Hóast stóru íløguna í tøkniliga útgerð, varð funnist at lærarum, tí teir ikki vóru nóg raskir at nýta tøknina, annaðhvørt tí teir ikki vóru nóg væl skúlaðir ella vóru ímóti henni, og tí tilfarið ikki var nóg gott, og mann átti at gjørt enn størri íløgur (Oppenheimer, 2004).

Larry Cuban vísir á, at tøkniliga menningin fer fram í eini ringrás. Hon byrjar altíð við, at stórar væntanir verða settar til tøknina, og stórar vónir eru til, at tøknin skal kollvelta undirvísingina. Men tá tað stóra akademiska frambrotið ikki hendir, finnast fólk at manglandi fígging, manglandi áhuga hjá lærarum, og at lærarar seta seg upp í móti ella

eru ov varnir at nýta tøknina orsakað av manglandi førleika og førleikamenning. Tá hetta kemur í rætt lag, endar ringrásin við, at mann skyldar upp á amboðini, og hetta hendir júst um somu tíð, sum eitt nýtt kollveltandi tøkniligt undur sær dagsins ljós. Fyri hvørja ringrás økjast herferðirnar í vavi og hava við sær størri royndir, størri vónir og størri fíggjarligan kostnað.

At tíðin er komin til eina nýggja ringrás, tá tað snýr seg um teldlar, sæst millum annað í greinarøð, sum hevur staðið í Skúlablaðnum og á teirra heimasíðu í apríl og mai mánaða í ár. Tosað verður við Vár í Ólavsstovu, granskara á Námsvísundadeildini. Hon greiðir frá, at óendaligir møguleikar eru í talgildu amboðunum, og finst samtíðis at, at lærarar aftra seg við at nýta tøknina, millum annað tí teir mangla førleika og ikki fáa førleikament seg á økinum.

## Netsamband og verri úrslit

Kanningar vísa, at næmingar, sum hava teldu heima, klára seg verri bæði í støddfrøði og lesing  enn næmingar, sum ikki hava tað. Hetta sæst millum annað í Pisa-kanningini (Fuchs & Woessmann 2004). Tað áhugaverda er, at kanningar vísa, at bert við at hava tólið heima, økist nýtslan. Næmingar, sum ganga á skúlum, har netsamband er, klára seg eisini verrri, enn næmingar, sum ganga í skúlum uttan netsamband (Spitzer, 2014).

## Multitasking

Talgildu amboðini lata upp fyri multitasking í undirvísingarstøðum, mann skal líka kanna Facebook, spæla Minecraft ella kanna boð – serliga um teksturin er avbjóðandi. Multitasking elvir aftur til, at heilin fatanarliga verður ovbyrjaður. Hesir møguleikar ganga aftur út yvir fatanina og tað sum tú lesur, tí tú ikki ert hugsavnaður um tað, tú gert. Tey flestu vaksnu vita, hvussu skjótt tað er líka at kanna teldupost, meðan mann ger okkurt annað, og tað sama gera børnini.

Eftirmetingin av tiltakinum í Odder kommunu vísti, at teldilin er lættur at flyta, og at hetta elvir til, at næmingar kunnu taka hann við sær alla staðni á skúlanum. Hann er skjótur at tendra, og battaríið heldur ein skúladag. Hinvegin verður funnist at, at teldlinum manglar eitt veruligt knappaborð, og at tað er trupult at arbeiða við tí, sum er. Tað, sum serliga gjørdi teldlin óegnaðan, var, at næmingar ofta vórðu ørkymlaðir og illa órógvaðir av øllum teimum møguleikum, teldilin gevur at gera onnur ting.

## Eygleiða heilan

Mann veit, at heilin støðugt broytist, tá hann verður nýttur. Umframt nógvar empiriskar kanningar og sjálvrapporteringar ber eisini til at hyggja at, hvussu heilin virkar. Við teirri

vitanini um lærumekanismur, sum mann hevur í dag, ber til at fáa hilling á, hvørjir vandar eru við at nýta talgildu miðlarnar í tann mun, børn nýta teir í dag, tað vil siga fleiri tímar dagliga (Spitzer, 2014).

Heilin lærir alla tíðina, og hetta merkir, at talgilda nýtslan ávirkar brúkaran onkursvegna. Tað ber snøgt sagt ikki til annað. Tá tað er sagt, er týdningarmikið at hava í huga, at heilin er eitt úrslit av menningargongdini. Heilin hevur ment seg við at laga seg til treytirnar í umhvørvinum. Henda tillaging hevur fleiri ættarlið á baki, og tøknin er ikki partur av hesi tillaging (Spitzer, 2014).

Í dag síggjast fleiri vælferðarsjúkur, sum eru fylgja av, at menniskjan ikki livir í tráð við gamla lívsháttin, har menniskjan veiddi og soleiðis nýtti kroppin regluliga og át føði, sum innihelt nógvar trevjur og klíggi. Júst á sama hátt kunnu árin, sum talgildu miðlarnir hava á andaligu og sálarligu gongdirnar, verða eygleidd (Spitzer, 2014).

Heilagranskarar hava leingi vitað, at stórur munur er á heilanum á ávikavist einum barni, sum hevur verið fyri umsorganarsviki, og soleiðis er vorðið undirstimulerað, og einum, sum er vaksið upp undir vanligum umstøðum. Granskarar hava seinastu árini ávarað móti, at børn undir tvey ár síggja skerm. Orsøkin er millum annað, at heilin fyrstu árini veksur sera nógv. Í vavi veksur hann úr 300 grammum upp í 900 fyrsta árið. Hetta merkir, at meiri tíð, ið nýtt verður framman fyri skermi, minni tíð verður at læra grundleggjandi førleikar. Tá mann letur børn sita nógv við skermi, venur heilin seg við tey skjótu skiftini, sum eru á skerminum og verður yvirstimuleraður. Heilin lærir, at ein seyður glitrar, syngur og dansar. Tá barnið sostatt fer niðan í hagan og hyggur at einum veruligum seyði, keðir tað seg, tí heilin hevur lært, at tað skal meiri til. Kanningar vísa, at børn, sum hyggja í skerm, áðrenn tey eru tvey ár, økja sannlíkindini fyri at fáa trupulleikar við uppmerk-seminum, tá tey seinni fara í skúla. Harumframt er týðiligt samband millum skermnýtslu og evnini at hugsavna seg, tað vil siga, jú meiri skerm, børnini síggja, truplari verður tað at hugsavna seg um eitt nú at lesa og rokna. Orsøkin er, at tey venja heilan við, at alt skal ganga skjótt fyri seg. Læring er ein sein prosess, og tá heilin veruliga skal læra nakað nýtt og seinni duga at brúka tað, krevur tað hugsavning. Jú meiri skerm børnini sostatt síggja, meira má heilin verða stimbraður fyri ikki at keða seg. Ein teldil ella snildfon gevur næminginum góðar møguleikar at spæla ymisk spøl, skifta millum pallar, og soleiðis venja heilan við skjót skifti, sum aftur ger tað trupult at hugsavna seg og læra.

## To swipe or not to swipe

Við at nýta heilan økist tann parturin av heilanum, sum verður nýttur. Í tann mun virkar heilin sum ein vøddi. At síggja, hoyra, hugsa, kenna og handla leggur spor av minnum eftir seg. Synapsir í heilanum senda elektriskar impulsir millum nervakyknurnar. Hesar

synapsir, sum kunnu verða myndaðar og filmaðar og sostatt sjónliga verða eygleiddar, broytast alt eftir, um tær verða nýttar ella ikki. Tær verða tjúkkari við nýtslu, og fara til endans til grundar, um tær ikki verða nýttar. Tær eru støðugt undir umbygging. Hetta merkir, at meiri ein persónur lærir, fleiri spor hevur hann lagt eftir seg í heilanum, ið gera hann føran fyri at handla og kenna seg til rættis í umhvørvinum.

Skal tað lærda enda í langtíðarminninum, er tað týdningarmikið, at tað verður viðgjørt væl og virðiliga. At tilfar er viðgjørt væl, merkir, at elektriskir impulsir eru sendir gjøgnum synapsirnar og soleiðis millum nervakyknurnar. Jú fleiri synapsir og nervakyknur verða virknar og samstarva, betur festir tað seg. Hetta merkir aftur, at betur tú arbeiðir við einum evni, betur festir tað seg. Uppmerksemið er eisini týdningarmikið, tí tá tú ert selektivt uppmerksamur, hugsavnar tú teg um okkurt ávíst og sorterar annað frá. Tá mann er selektivur, eru økini virknari, og hetta elvir aftur til betri viðgerð og betri læring.

Hippocampus er eitt týdningarmikið øki í heilanum, tí her verða hendingar, upplivingar og tað, mann lærir, tvinnað saman og goymt í minninum. Um hippocampus ikki virkar væl, verða nýggj minni heldur ikki væl goymd. Tí minnast eldri fólk væl tað, sum fór fram, tá tey vóru ung, men ikki, hvat hendi í gjár.

Hippocampus er øðrvísi enn onnur øki í heilanum, tí her vaksa nýggjar heilakyknur fram. Skulu nýggju kyknurnar virka, skulu tær virka í einum netverki, sum longu er til staðar. Um tú setir eyka ram á telduna, verður hon ikki skjótari, um tú ikki samtíðis setir rammið saman við hinum lutunum í telduni. Kyknurnar kunnu bert gerast partar av netverkinum gjøgnum læring og rørslu, og her er tað ikki nóg mikið at læra einføld ting, men tað er neyðugt við stórum avbjóðingum. Einfaldar uppgávur elva til, at kyknurnar fara til grundar. Ikki fyrr enn avbjóðingarnar gerast nóg stórar, yvirliva tær.

Talan er sostatt ikki um treytaða og ótreytaða læring ella at læra okkurt uttanat. Neyðugt er við uppgávum, har royndir renna saman við kunnleika um umheimin og tað, tú sansar í løtuni. Tá tú handlar við støði í hesum, er uppgávan nóg avbjóðandi. Hetta hendir ofta í samspæli við onnur menniskju, har tú mást laga teg eftir øðrum við at gera ætlanir og broyta tær í samljóði við tey. Endamálið við kyknunum er at styrkja og fullgera tað, sum longu er.

Mann fær ta fatan, at nýtslan av talgildum amboðum í stóran mun snýr seg um at finna røttu appirnar og forritini og soleiðis gera undirvísingina góða og motiverandi. Teldan er sum amboð, ið er snikkað soleiðis til, at hon lættir okkum um arbeiðsbyrðuna. Enska orðið *to swipe*, verður ofta nýtt um at flyta fingurin eftir skerminum. Hyggur man til dømis at møguleikunum við læringsappunum, nýtir tú nógv fingurin at *swipa* við. Tú flytur hann

eftir skerminum fyri at flyta okkurt, til dømis flyta endingar at einum stovni. Ella finna rætta úrslitið at seta afturat roknistykkinum. Nøkur forrit gera tað møguligt hjá næminginum at taka talvuna niður á sín teldil og soleiðis sleppa undan at taka notur. Tú kanst eisini velja at hyggja at einum filmi um tað, tú skalt læra. Endamálið er tað sama, at gera tað lættari hjá tær at loysa uppgávuna.

Viðvíkjandi læring er hetta ein andsøgn, tí skal ein næmingur læra nakað, er neyðugt, at hann viðger evnið grundleggjandi og rætt. Tekur tú mynd av notunum, verða tær ikki viðgjørdar, skrivar tú ikki endingarnar, so hefta tær ikki veruliga, og djúpdin manglar í tí lærda. Tá ein næmingur skrivar ein stav til dømis, fær hann tíðardimensiónina, og hann fær ta rúmligu og persónligu dimensiónina við, og soleiðis arbeiðir hann djypri við tilfarinum.

Tað mótsetta ger seg eisini galdandi, tað vil siga, at grynri mann arbeiðir við einum evni, færri synapsir verða aktiveraðar, og minni lærir mann. Hetta merkir, at tá mann bert flytur fingurin eftir teldlinum, so verða færri synapsir aktiveraðir, og samstarvið verður har eftir.

Viðvíkjandi læringsappunum varð stór kanning gjørd í 2012, sum vísti, at tær flestu appirnar eru mentar á slíkan hátt, at tær venja ein førleika, eitt nú tabel, og eru tøkniligt glitur.  Tær eru fínar, um tú skalt duga okkurt uttanat beint nú, men skal vitanin goymast, so tú kanst brúka hana eitt nú kritiskt, so røkka appirnar ikki endamálinum (Murray og Olcese, 2011).

## E-bøkur

Skundað verður undir Nám at gera teldutøkt tilfar, tí hetta er framtíðin, sigst. Kanningar vísa tó, at næmingar, sum fingu eina ávísa upphædd at keypa bøkur ella e-bøkur fyri, í stóran mun keyptu bøkurnar, tí teir troyttaðust av e-bókunum, og at tær kravdu meiri av teimum. Ljósið á teldlinum elvir til møði, eins og fatanin av, hvussu langur teksturin er, og hvar ávís ting hava staðið í tekstinum, mangla. Umframt hetta ávirkar manglandi kenslan av sjálvari bókini ella pappírinum eisini fatanina. Eitt annað, sum ger seg galdandi, er, at børn, sum lesa á skermi oftari kenna strongd og møði, tí skermurin krevur meiri av teimum fatanarliga (Mangen, Walgermo & Brønnick, 2013).

Kanningar vísa eisini, at e-bøkurnar í stóran mun eru fysiskar bøkur, ið eru gjørdar talgildar, tað vil siga uttan námsfrøðiliga viðgerð lagaða til talgildu tøknina. E-bókin er slóðbrotandi á tann hátt, at hon kann innihalda hyperlink, sum ger, at tú kanst flyta teg frá upprunatekstinum. Lesur tú eitt nú um seinna heimsbardaga, hevur tú møguleika at síggja filmsbrot ella flyta millum tekstir og myndir. Kanningar vísa nú, at fleiri hyperlinks eru, verri gerst læringin, tí fokus verður flutt í heilum. (Woody, Daniel og Baker, 2010).

Gransking vísir, at tá tað snýr seg um truplan tekst, tað vil siga tekst, ið krevur, at næmingurin hugsar seg um, skilir hann nógv betur tað, sum verður lisið á pappíri. Er teksturin stuttur og lættur, megna næmingar at svara rætt upp á spurningar viðvíkjandi innihaldi, men teir næmingar, sum hava lisið á pappíri skilja tekstin betur enn næmingar, sum hava lisið á skermi (Mangen, Walgermo & Brønnick, 2013). Tað, sum næmingar lesa á pappíri, festir seg sostatt betur, og næmingar duga betur at nýta vitanina. Mann kann siga, at vitanin, ið ein ognar sær á skermi, er vitan, sum ikki kann brúkast til annað enn her og nú at svara rætt ella skeivt upp á eitt spurnarblað, og gevur ikki eitt djypri innlit í tað lærda. Í hesum sambandi er óheppið, at næmingar, sum skulu til talgildar royndir, ikki sleppa at velja, um teir vilja hava uppgávurnar á pappíri ella talgilt, tí sannlíkindini fyri at fáa betri úrslit til próvtøkuna, gerast størri, um uppgávan er tøk á pappíri, hjá teim næmingum, sum hava lættari við at lesa á pappíri.

## Google ættarliðið

Seinastu árini hevur skúlaskipanin meiri ella minni tikið frástøðu frá uttanatlæru. Undir lovorðunum: ”at læra at søkja sær vitan” hevur mann lagt dent á, at næmingar ikki hava fyri neyðini at duga tingini uttanat, men skulu vita, **hvar** teir kunnu leita.

Kanningar eru gjørdar av næmingum, sum skuldu loysa uppgávur. Helvtin av teimum slapp at nýta netið, meðan hinir skuldu nýta bøkur og annað tilfar, sum ikki var talgilt. Tá mann seinni spurdi næmingarnar um uppgávuna, mintust teir næmingar, sum høvdu nýtt Google, ikki úrslitið ella tað, teir høvdu funnið fram til. Hinvegin mintust teir, hvar úrslitið lá, ella hvar teir høvdu funnið vitanina. Teir goymdu sostatt vitanina uttan fyri seg. Næmingar, sum høvdu nýtt aðrar miðlar enn talgildar, mintust úrslitið aftur og høvdu sostatt arbeitt djypri við tilfarinum og ognað sær eina vitan, sum teir kundu nýta (Sparrow, Liu &Wegner, 2011).

Men er tað ikki líkamikið, um næmingurin veit nakað, tá hann dugir at finna sær vitan eftir tørvi? Svarið er nei. Fyri tað fyrsta, veitst tú bara tað, sum Google veit, og tá tú ikki ert á, veitst tú einki. Harumframt er neyðugt við fjølbroyttari og hollari vitan, skalt tú fáa sum mest burturúr Google. Tú mást hava eina grundvitan, sum ger teg føran fyri at skyna millum allar upplýsingarnar, sum eru, og sum ger teg føran fyri at nýta vitanina á ein kritiskan og kreativan hátt. Hetta merkir, at neyðugt er at læra næmingarnar nakrar førleikar og geva teimum eina grundvitan, sum ger teir førar fyri at nýta netið, og tá skal meiri til enn bert at geva næmingunum tøkni. Tá vit lata næmingar googla, læra teir júst tað mótsetta av tí, sum vit vóna, at teir læra, tí teir læra bara, hvar vitanin er. Teir læra at goyma vitanina uttan fyri seg sjálvar, og soleiðis virkar Google fordummandi (Spitzer, 2014).

Stór kanning varð gjørd, sum hevði til endamáls at lýsa atferðina hjá ungum, tá tey leita sær vitan á netinum. Kanningin vísti, at hátturin ikki er broyttur seinastu 15 árini, hóast tey hava havt betri atgongd til amboð og tøkni í skúlanum. Tey leita yvirfladiskt – hetta er ikki bert galdandi fyri ung, men eisini fyri akademikarar, og tey hava trupult við keldu-kritikki. Av tí at tað er so lætt at leita, tað vil siga, mann kann spyrja beinleiðis á netinum heldur enn at seta saman lyklaorð og soleiðis avmarka leitingina, hava fólk trupult at avmarka seg og hava eina kritiska tilgongd til tilfarið (Spitzer, 2014).

## Sosial isolatión

Teldunýtslan í barnagarðsaldri hevur neiliga ávirkan á uppmerksemið og lesiførleikan. Harumframt vísa kanningar á sosiala isoloatión. Hóast miðlarnir hava heitið sosialir miðlar, vísa kanningar, at talgildu netverkini ikki elva til betri og fleiri sambond, men hinvegin til einsemi og yvirfladisk sambond (Spitzer, 2014).

Kanningar vísa, at heilin veksur, tá mann er saman við øðrum menniskjum. Næmingar í dagsins samfelag sita, sum vit longu hava sæð, fyri ein stóran part framman fyri skermi. Við at geva næmingum møguleika at sita óavmarkað við skermi í skúlatíð, økist tíðin, og tað merkir, at mann satt at siga forðar næmingum í at læra – meðan teir eru í skúla.

## Empati

Kanningar (sjálvrapporteringar) vísa, at empatisku evnini hjá ungum eru minkað við 75% seinastu 30 árini, har tað størsta fallið er farið fram seinastu 10 árini (Zaki, 2010). Empatisku evnini mennast í samspæli við onnur. Børn, sum sita nógv við skermi, mangla tað sosiala samanspælið, tí hóast tey spæla on-line spøl, er samskiftið ikki eitt samskifti, sum er her og nú, men er forskotið (Spitzer, 2014). Harumframt mennist partur av heilanum við samanspæli. Um barnið situr góðar 6 tímar um dagin við skermi, mangla hesir tímarnir í vanliga samskiftinum, og sostatt mennist heilin ikki, sum hann skal.

Eitt annað, sum ávirkar empatisku evnini, eru skjótispølini og harðligu spølini. Mann hevur gjørt fleiri kanningar, sum vísa, at fólk, sum hava spælt ógvuslig spøl, reagera nógv seinni um yvirhøvur, tá onnur eru í neyð, eins og tey hava nógv verri at seta seg inn í støðurnar hjá øðrum. Mann skal her hugsa um, at yngri børn, sum síggja okkurt á skermi, eru sannførd um, at tað veruliga er farið fram. Børn heilt upp í skúlaaldur hava ilt við at skyna á, hvat er veruligt og hvat er óveruligt (Spitzer, 2014).

## Teldil sum motivatión

*Vit liva í eini broytingartið, har ið tað gongur sera skjótt við menningini á KT-økinum, og børnini eru skjót at laga seg til teir nýggju møguleikarnar, sum eru ein partur av*

*teirra gerandisdegi, og skúlin fer at fáa tað truplari við at fanga næmingarnar, um skúlin ikki fylgir við á KT-økinum*. Soleiðis stendur at lesa á heimasíðuni hjá Stranda skúla.

Sambært útsøgnini er ein orsøk til at geva næmingunum teldil, at skúlin ynskir at "fanga" næmingarnar. Orðið "fanga" leiðir tankarnar aftur á motivatión – tað vil siga, at teldilin onkursvegna skal motivera næmingar at læra.

Eitt hitt mest nýtta ástøðið um motivatión er Self-determination theory (Deci & Ryan, 2000), sum lýsir motivatión sum annaðhvørt óbeinleiðis ella beinleiðis motivatión. Tá ein persónur er beinleiðis motiveraður, ger hann eitt hvørt av egnum hugi, tí tað gevur honum okkurt at gera tað. Tá mann er beinleiðis motiveraður, lærir mann mest og er í *flow*. Tá ein persónur er óbeinleiðis motiveraður, kemur motivatiónin ikki innifrá, men er stýrd av onkrum útifrá. Tann óbeinleiðis motivatiónin verður aftur býtt í fýra, har mann er meiri ella minni stýrdur av tí, sum kemur útifrá.

Nýta vit ástøðið í samband við eina undirvísingarstøðu, er besta undirvísingarstøðan tann, har næmingurin er beinleiðis motiveraður fyri at læra. Tað vil siga, hann fer undir arbeiðið, tí hann kennir, at tað gevur honum nakað. Men eingin er beinleiðis motiveraður alla tíð, og tí kann minni eisini gera tað. Trupulleikin, tá tosað verður um motivatión, er tó, at kanningar vísa, at um mann er beinleiðis motiveraður fyri at gera eitt hvørt og síðani fær eina gularót fyri at gera tað, sum mann annars er motiveraður til at gera fyri einki, so gongur tað út yvir motivatiónina og elvir til, at motivatiónin fellur. Venda vit aftur til teldlar sum motivatión fyri at læra, kunnu teir sambært hesum elva til, at næmingar, sum eru beinleiðis motiveraðir fyri at læra, verða minni motiveraðir, tí teir fáa eina gularót (teldilin) afturfyri.

Men hvat so við teim næmingum, sum eru ómotiveraðir? Kann teldilin nýtast sum gularót til teirra? Odder kommuna hevur gingið undan, tá tað snýr seg um teldlar til næmingar. Í fjør varð eitt úrslit almannakunngjørt um, hvussu tað hevur gingist við at nýta teldlar í studentaskúlunum. Tað vísti, at teldilin einans virkar motiverandi í byrjanini. So skjótt, sum nýggjheitsvirðið er farið, og fokus á umheimin minkar, minkar motivatiónin eisini. Við øðrum orðum megnar teldilin hvørki at motivera teir næmingar, sum eru illa fyri, ella teir, sum er væl fyri. Teldilin megnar sostatt ikki at liva upp til endamálið at "fanga" næmingarnar.

## Sum at nýta tannkrem

Í Silicon Valley velja alt fleiri, sum starvast í tøkniliga heiminum at koyra børn síni í skúlar, sum ikki nýta tøkni. Alan Eagle, ein av stjórunum í Google, er ein teirra. Hann

sigur, at tað er als eingin orsøk at óttast, at børnini ikki læra at nýta tøknina. Tí sum hann sigur: *It's supereasy. It's like learning to use toothpaste," "At Google and all these places, we make technology as brain-dead easy to use as possible. There's no reason why kids can't figure it out when they get older"* (Richteloct, 2011). Í somu grein stóð skrivað: *He discusses how Silicon Valley executives and engineers are sending their kids to schools that do not use technology in the classroom but rely on old fashioned methods because they do not believe computers and other technology enhance learning. On the contrary, they point to research that shows that it limits creativity, mind body coordination, and the human dimension of school that is so crucial to child development.*

Steve Jobs, sum menti teldilin, útalaði seg, áðrenn hann doyði, at hansara børn ikki sluppu at nýta teldil.

Áðrenn mann velur at lata næmingar hava óavmarkaða atgongd til talgildar miðlar í skúlanum, er neyðugt, at mann hyggur at barninum í síni heild, og ikki bert eftir talgildu møguleikunum. Tí mann má taka støði í tí veruleika, sum børnini veksa upp í í dag, og hann er, at tey nýta alt ov nógva tíð framman fyri skermum, sum er. Henda tíðin fer frá øðrum týdningarmiklum lutum, eins og nýtslan ávirkar teirra andligu evni at læra, tí amboðini leggja upp til eina multitaskandi atferð, har rúmd ikki er fyri hugsavning og uppmerksemi, eins og dýpdin manglar í tí lærda.

Talgildu amboðini koma ongantíð at lyfta støðið í fólkaskúlanum. Í allar bestu førum kunnu tey geva rúm fyri eini øðrvísi undirvísing. Læring, sum lyftir støðið, er læring, sum fer fram, tá eitt persónligt samband er millum lærara og næming, tá ein lærari hugfangar næmingin. Læring er at tendra ein neista í næminginum. Og neistin brennur ikki betur við teldlinum sum millumlið. Tvørturímóti flytur hann fokus frá veruligu læringini. Um mann heldur ger íløgur í eyka lærarakreftir, kann mann betra munandi um undirvísingina - tá fæst verulig broyting fyri pengarnar.

## Keldur


Bjøkeng, Per Kristian: 2011: Nettkidsa. Barnas digitale hverdag. Cappelen Damm

Christensen, E. Smadrede iPads koster kassen. Folkeskolen 14. jan. 2013

Cuban, L: 1986: Teachers and machines. Teachers College Press, New York

Cuban, L: 1993: Computers Meet Classroom: Classroom Wins. Teachers College Record

Cuban, L: 2001: Oversold and underused. Computers in the Classroom. Harvard University Press,

Cuban, L, Kirkpatrick H 1998: Computers make Kids smarter – Right? Technos 7:

Oppenheimer, T. 2004: *The Flickering Mind. Saving Education from the False Promise of Technology*.

Ólavsstovu, Vár í: 2015: Lærarar varnir at brúka talgildar miðlar.

http://www.skulabladid.fo/Heim.aspx?ID=610&M=News&PID=1962&NewsID=8193

Ólavsstovu, Vár í: 2015: Lætt at framleiða talgilt tilfar.

http://www.skulabladid.fo/Heim.aspx?ID=610&M=News&PID=1962&NewsID=8192

Ólavsstovu, Vár í: 2015: Óendaligir møguleikar í talgildu miðlunum. Skúlablaðið 2, 2015

Richteloct, M. A Silicon Valley School That Doesn't Compute. The New York Times. 22. Oct. 2011

Sparrow, B, Liy, J. & Wegner, D. M: 2011: *Google Effects on Memory: Cognitive Consequences of Having Information at Our Fingertips*. Science Express

http://www.sciencemag.org/content/333/6043/776.short

Spitzer, M. 2014: *Digitale Demenz. Wie wir uns und unsere Kinder um den Verstand bringen*. Droemer

Woody, Daniel, D.B, Baker C. A., E-books or textbooks: *Students prefer textbooks*.

http://www.sciencedirect.com/science/article/pii/S0360131510001120

Zaki, J: 2010. What? Me Care? Young Are Less Empathetic.
http://www.scientificamerican.com/article/what-me-care/
http://politiken.dk/forbrugogliv/livsstil/familieliv/ECE1779536/boern-bruger-syv-timer-daglig-foran-en-skaerm/

POLICY STATEMENT Media Use by Children Younger Than 2 Years. Pediatrics 2011; 128; 1040; originally published online October 17, 2011; Council on Communications and Media M
http://www.dailymail.co.uk/news/article-2929530/Does-toddler-play-iPad-Taiwan-makes-ILLEGAL-parents-let-children-two-use-electronic-gadgets-18s-limit-use-reasonable-lengths.html

# Næmingar og ymiskleiki

Olav Absalonsen

**Næmingar verða ofta mettir eftir einum skala, sum sigur, um næmingurin er góður ella vánaligur ella onkustaðni ímillum. Men hetta er púra burturvið: næmingar eru samansettir sum persónar við eginleikum á ymiskum økjum og í fleiri dimensiónum. Í hesi grein skulu vit hyggja at trimum økjum: Fyrst læristílur, so hugburður til tað at læra og at enda intellektuell búning. Um ein skúli sær næmingarnar sum borgarar, ið eru eitt slag av kundum, hann er settur at tæna, so er alneyðugt, at skúlin við øllum sínum starvsfólki skilir, hvussu fjølbroytt næmingafjøldin er. Ger hann ikki tað, er hann ikki góður tænari, og avleiðingin er, at nógvir næmingar rýma.**

At næmingar, sum byrja á miðnámi, falla frá, áðrenn útbúgvingin er liðug, er ikki ókent. Vit hava kanska hug at halda, at tað eru teir vánaligu næmingarnir, sum falla frá, og at hetta kemur av, at teir megna ikki at fylgja við fakliga, og so er ein útvegur at gevast við skúlanum. Men um vit halda tað, so fara vit skeiv. Kanningar, hví næmingar gevast í einari útbúgving, vísa, at mong gevast, tí tey hava tað trupult fakliga, men nógv onnur, sum gevast, eru góðir næmingar, sum halda uppat, tí teir eru ónøgdir við undirvísingina.

Ein føroysk frágreiðing um fráfall á Studentaskúlanum í Hoydølum kom út í 2006 (Jógvan Dahl, Elisabeth Holm og Bjørg Róin). Tað er ein kvantitativ kanning, hvat varð av teimum, sum góvust, og um samanhang var við upptøkukarakterir. Frágreiðingin var eisini um atferð hjá næmingum, áðrenn teir gevast í skúlanum. Næmingar, sum byrjaðu í 1992, 1997 og 2002 vóru við í kanningini. Fráfallið var ávikavist 32%, 38% og 32%. Samanlagt góvust 155 næmingar av 459, sum byrjaðu, og tað er 34%. Av gentunum góvust 80 av 277 (29%), og 75 dreingir av 182 (41%) hildu uppat. Fráfallið er heldur størri hjá næmingum við lutfalsliga lágum upptøkukarakterum.

Uppmøtingin er ring, áðrenn næmingar gevast, og tí spurdu granskararnir næmingarnar um orsøkir til vánaligu uppmøtingina og um ætlanir at gevast. Sjúka, lítil motivatión og skúlamøði eru orsøkir til ringa uppmøting. Samanhang er ímillum vánaligar karakterir og ætlanir um at gevast. Men ímillum góðar næmingar hevði helvtin hugsað um at gevast, og meira enn 20% av framúr góðum næmingum høvdu hugsað um tað. Nakrar av orsøkunum at gevast eru: vantandi førleiki í ávísum fakum, ov nógv heimaarbeiði, vantandi motivatión, misnøgd við undirvísing ella lærara, lítil tíð til heimaarbeiði og ring viðurskifti við floksfelagar.

Frágreiðingin (s. 56-57) hevur nøkur tilmæli fyri at minka um fráfall so sum at broyta karaktergeving í fólkaskúlanum og hava betri ráðgeving til næmingar, sum ætla sær á miðnám. Men frágreiðingin hevur eingi tilmæli um at bøta um meting fyri at læra, ymiskar undirvísingarhættir ella hættir, sum leggja upp fyri ymiskum læristílum ella øðrum ymiskleikum ímillum næmingar.

## Læristílar

Næmingar eru ymiskir í sambandi við, hvussu teir læra. Læristílar sipa til ein hóp av eginleikum hjá næmingum. Summum dámar væl teoretiska og abstrakta hugsan; øðrum dámar betur at eygleiða og síggja fyribrigdini. Summi læra betur, um informatión verður løgd fram visuelt, meðan onnur læra betur, um hon er verbal. Eingin læristílur er betri enn ein annar. Eitt mál í undirvísing má vera at gera næmingar førar fyri at nýta ein og hvønn læristíl, tí teir fáa brúk fyri øllum hesum førleikum í arbeiðslívinum. Tað finnast nógvir myndlar at lýsa læristíl. Niðanfyri verða tríggir av teimum lýstir:

1. Kolb-myndilin, ið er væl kendur í bókum um undirvísing
2. MBTI-myndilin, ið eisini verður brúktur at meta um persónligheitir
3. Felder-Silverman myndilin, ið kanska er minni kendur, men ikki minni áhugaverdur

### Kolb-myndilin

David Kolb nýtti myndil Lewin um læring, ið skal síggjast sum ein tilgongd í fýra stigum, sum síðani verður endurtikin í einari ringrás: 1. Møguleikin av fáa ítøkiligar royndir; 2. At eygleiða og reflektera um egnar royndir; 3. At skapa óítøkiligar teoriir og hugtøk; 4. At nýta og laga teoriir til veruligar kanningar, sum gevur nýggjar royndir, og so byrjar næsta umfar.

Honey and Mumford hava gjørt eitt frábrigdi av myndli Kolb, har teir lýsa stigini í læringsringrásini. Teir áseta fýra stig í einum læringsumfari eins og Lewin, men munurin er, at Kolb nýtti myndil Lewin at áseta teir fýra læristílirnar, har Honey og Mumford nýttu myndil Kolb at skapa teirra læringsringrás.

Læring er ein tilgongd, ið transformerar royndir, og tað eru tveir hættir at tilogna sær royndir, og tveir hættir at transformera hana. Henda samanseting førir til fýra læristílir:

1. Akkomodativir næmingar gera sær royndir ítøkiliga heldur enn at hugsa abstrakt, og teir vilja helst royna seg fram. Teir spyrja ofta hvat um?
2. Divergentir næmingar gera sær royndir ítøkiliga heldur enn at hugsa abstrakt, og teir reflektera um tær, og fara frá tí einstaka til tað almenna. Teir spyrja ofta hví?
3. Assimilativir næmingar eru teir mest kognitivu. Teir hava betri hug at hugsa abstrakt enn at gera ítøkiligar royndir. Teir spyrja ofta hvat?

4. Konvergentir næmingar læra við at hugsa fyrst og síðani royna hugskotini fyri at vita, um tey virka. Teir spyrja ofta hvussu?

Tað var Piaget, sum var útbúgvin lívfrøðingur, ið kom við ástøðinum um assimilering og akkomodering í sambandi við, hvussu børn uppliva og uppfata umheimin. Við assimilering uppfatar barnið umheimin soleiðis, at henda uppfatan passar við tað, sum barnið frammanundan heldur og meinar. Við akkomodering broytir barnið hugsan og meining, um tær nýggju royndirnar ikki passa við tað, sum barnið frammanundan heldur og meinar. Sambært Piaget fara assimilering og akkomodering fram samstundis, tá ið vit uppliva umheimin. Tá ið Kolb nýtir somu hugtøk í sambandi við læristílar, er hugsanin eisini, at einstaki næmingurin flytur seg í ringrás frá einum læristíli til annan, so hvørt sum hann nemur sær lærdóm.

Talva 1. Kolb myndilin um læristílar

| | At gera<br>Eksperimentera aktivt | At hyggja<br>Eygleiða reflektivt |
|---|---|---|
| At uppliva<br>Ítøkiligar royndir | Akkomodativir næmingar<br>Aktivistar | Divergentir næmingar<br>Reflektorar |
| At hugsa<br>Abstrakt konseptualisering | Konvergentir næmingar<br>Pragmatikarar | Assimilativir næmingar<br>Teoretikarar |

## MBTI-myndilin

MBTI (the Myer-Briggs Type Indicator) byggir á ástøðið hjá Carl Jung um sálarfrøðiligar týpur, men hesin myndil er eisini væl egnaður at meta um læristíl. Sambært hesum myndli verða næmingarnir býttir í tveir bólkar eftir 4 skalum:

1. Tey ekstrovertu royna seg fram og fokusera á fólk í umheiminum; tey introvertu hugsa seg um og fokusera inneftir eftir hugskotum
2. Tey sansandi eru praktisk og fokusera á fakta og framferðarhættir; tey intuitivu eru imaginativ og fokusera á meiningar og møguleikar
3. Tey hugsandi eru skeptisk og hava lyndi til at taka avgerðir eftir logikki og eftir reglum; tey kensluligu eru takklatin av lyndi og taka avgerðir eftir persónligum og humanistiskum atliti
4. Dómarar seta eina dagsskrá og fylgja henni og royna at koma til niðurstøður, sjálvt um vitanin um evnið er ófullfíggjað; uppfatarar laga seg eftir umstøðunum og útseta niðurstøður fyri at fáa meira at vita

Eftir MBTI verður hvør næmingur mettur eftir hesum 4 skalum, har hann í hvørjum skala er annað av tveimum, og tí verður talan um 16 ymiskar læristílar eftir hesum myndli. Nógvar kanningar eru gjørdar um, hvussu ymiskar týpur klára seg í útbúgving. Ein, sum var gjørd í North Carolina State University, hevði til dømis hesar niðurstøður:

- Í skeiðum við høgum abstraktiónsstigi kláraðu intuitivir næmingar seg greitt betur enn sansandi næmingar
- Í einum ópersónligum læringsumhvørvi kláraðu tey hugsandi seg klárt betur enn tey kensluligu, og tey kensluligu høvdu eisini lættari við at halda uppat í útbúgvingini, tóat tey kláraðu seg væl.
- Í útbúgvingum við stórum krøvum og tilsvarandi tørvi at gagnnýta tíðina væl kláraðu dómarar seg klárt betur enn uppfatarar
- Tey ekstrovertu vóru meira positiv enn tey introvertu at gera heimaarbeiði í bólkum

Samanumtikið kunnu  kanningarnar við MBTI siga okkum, at næmingar hava ymiskar mátar at læra, og at hesir ymisku mátar krevja ymiskar undirvísingarhættir og ymisk læringsumhvørvi.

## Felder-Silverman-myndilin

Felder-Silverman-myndilin finnur læristílin hjá næminginum við at svara 4 spurningum:

1. Dámar næminginum betur sansandi enn intuitiva informatión?
2. Fatar næmingurin visuella ella verbala informatión meira effektivt?
3. Dámar næminginum betur at viðgera informatión aktivt ella reflektivt?
4. Setir næmingurin seg inn í informatión sekvensielt ella globalt?

Felder-Silverman-myndilin hevur sostatt eisini 16 ymiskar læristílar. Fyrsti spurningur í Felder-Silverman svarar til annað punkt í MBTI. Og triði spurningur hjá Felder-Silverman svarar til aktivu/reflektivu dimensiónina í Kolb-myndlinum. Punkt 2 um visuella ella verbala informatión er viðkomandi í undirvísing. Í einari samanleggin av fleiri kanningum vísa Felder og Brent á, at 82% av lesandi í verkfrøði eru visuell lærandi, og kortini er tað mesta av undirvísingini verbal. Hetta kalla tey bæði eitt *mismatch*.

Punkt 4 um at læra sekvensielt ella globalt er eisini serstakt fyri Felder-Silverman-myndilin. Sambært Felder og Brent eru umleið 60% av lesandi í verkfrøði sekvensielt lærandi, og undirvísingin er eisini sera sekvensiell. Men tey globalt lærandi eru ein týðandi minniluti, og tey hava eina styrki í fleirfakligari læring, sum hinir ikki hava. Tey duga at hugsa tvørtur um faklig mørk, og hava íborin evni at granska.

## Samanumtikið um læristílar

Um vit høvdu lagt allar myndlarnar saman í ein, høvdu vit tí spurt 8 spurningar, sum skulu svarast við antin ella, og tað hevði givið okkum $2^8 = 256$ læristílar. Um vit hugsa okkum, at tað eisini ber til at liggja í miðjuni í hvørjum spurningi, hevði talið verið $3^8 = 6.561$ læristílar. Hesar kombinatorisku útrokningar kunnu sjálvsagt ikki brúkast beinleiðis

til nakað serligt. Men tær geva eina ábending um, at í veruleikanum er hvør einasti næmingur serstakur og ikki sama slag sum nakar annar. Tí er hetta bara ein ávaring ímóti at seta fólk í bás, sum kann vera til størri skaða enn gagn.

Tað er stórur vandi í at nýta læristíl hjá næmingi at meta um, hvat hann er førur fyri. Vandin liggur í manglandi vitan ímillum lærarar um læristílar, og tað førir til undirvísingarhættir og læringshættir, sum hóska til læristílin hjá læraranum sjálvum. Um undirvísingin miðar eftir aðrari síðuni í einari dimensión um læristíl, missa næmingar, ið eru í hinari síðuni, sjálvsálit, og læringin hjá teimum verður ineffektiv.

## Hugburður til tað at læra

Motivatión og hugburður til at læra hava nakað við hvørt annað at gera, men motivatión hevur ikki eina einstaka alment góðkenda definitión. Arnold, Cooper og Robertson mæla til at skilja motivatión sum samansetta av trimum lutum: kós (tað, sum persónurin ger), ídni (hvussu nógv hann roynir) og treysti (hvussu leingi hann heldur út). Hesin myndil kann brúkast, tí motivatión í læring er samansett og hongur saman við autonomi og eftirmeting.

Variablar, sum ávirka motivatión, eru: dugnaskapur, avrik, løn, nøgdsemi og virði av løn. Hesir variablar hanga saman: motivatión og dugnaskapur føra saman til avrik, sum eisini mennir dugnaskapin, men avrik førir eisini til løn, sum aftur hevur nøgdsemi við sær, og tað ger av, hvat virðið av lønini er, sum aftur ávirkar motivatiónina. Sostatt kunnu bæði kós, ídni og treysti í motivatiónini verða ávirkað. Tað er so uppgávan hjá læraranum at meta um, hvussu motivatiónin hjá næminginum skal fremjast. Uppgávan er vanliga lættari, um hann kennir næmingin. Hetta talar fyri, at flokkar á miðnámi hava sama lærara í fleiri ár, um tað er møguligt. Hugsanin, sum er nevnd omanfyri, kann eisini verða lýst við einari mynd, sum sæst á næstu síðu.

Eitt avrik er eitt úrslit av dugnaskapi og motivatión (í hesum føri ídni). Avrikið kann hava løn við sær. Løn kann vera so mangt, til dømis viðurkenning frá øðrum, ella at ein heldur tað, ið ein hevur sett sær fyri; lønin førir til meiri ella minni nøgdsemi, sum ger av, hvussu nógv næmingurin virðir lønina. Hevur lønin stórt uppfatað virði, stendur motivatiónin við, og ringrásin lýsir ta síðuna av motivatiónini. Kósin í motivatiónini er ikki við í myndini, tí hon snýr seg um, at næmingurin er meira áhugaður í ávísum evnum ella ávísum fakum.

Felder og Brent lýsa trý sløg av tilgongd til tað at læra: næmingar við grunnari tilgongd hava ein endurtakandi hugburð til tað at læra; næmingar við einari strategiskari tilgongd royna at náa onkrum málum; og næmingar við djúpari tilgongd til at læra hava ein hugburð um at síggja meining í lærdóminum. Ecclestone hevur teir somu tríggjar

bólkarnar: tann lærandi, sum krevur fastan grundvøll; tann, sum lagar seg strategiskt eftir krøvunum; og tann, sum pragmatiskt góðtekur umstøðurnar. Og so hevur hon tveir bólkar afturat: tey, sum royna at hanga í; og tey, sum reka fyri vág og vind.




Næmingar við djúpum hugburði at læra eru beinleiðis motiveraðir og intellektuelt forvitnir, og tað er tað, sum ger teir ídnar, heldur enn møguleikin fyri onkrum óbeinleiðis vinningi. Teir síggja útbúgving sum eina sjálvsagda menning og sum framhald av øðrum royndum. Strategiskir næmingar gera tað, sum skal til fyri at fáa góðar karakterir. Motivatiónin hjá teimum er óbeinleiðis við beinari kós, men stremban teirra at náa málinum er væl umhugsað. Teir hava grunnan hugburð, um tað er nóg mikið, og djúpan hugburð, tá ið tað krevst.

Grunnir næmingar (teir, sum pragmatiskt góðtaka umstøðurnar) eru vanliga óbeinleiðis motiveraðir. Teirra mál er at fáa okkurt slag av førleika, og teir góðtaka alt í lærubókum og í fyrilestrum. Tey, sum royna at hanga í, líkjast grunnum næmingum, men tey eru minni áhugað í útbúgving og løtt at verða sligin út av órógvandi umstøðum. Teirra motiv kann vera at fáa eitt arbeiði, og annars hava tey einki mið ella mál. Fyri tey, sum reka fyri vág og vind, er sjálvt óbeinleiðis motivatión ikki til.

Ecclestone førir fram, at tað mest vanliga motivið hjá teimum, sum taka útbúgvingar eftir 16 ár í Bretlandi, er pragmatiskt at góðtaka umstøðurnar. Kanningar í USA av næmingum, sum lesa evnafrøði og sálarfrøði, siga, at fyri lesandi á øðrum ári er strategiskur hugburður tann mest vanligi, og ikki fyrr enn á fjórða ári á universiteti er djúp læring tann mest vanligi hugburðurin. Fyri nógv 16-ára gomul er útbúgving nakað, sum ein skal ígjøgnum, meðan lærandi á hægri útbúgvingum eru meira hugað fyri útbúgving.

Sambært Felder og Brent vísir gransking, at næmingar við djúpum hugburði klára seg nógv betur enn næmingar við grunnum hugburði, bæði í karakterum og í læringsúrtøku, og tað, sum verður lært, hongur betur við – helst tí, at vitanin varð sett í samanhang heldur enn at vera terpað uttanatslæra.

Motivatión er ikki støðug í einum útbúgvingarskeiði, og næmingar kunnu ogna sær beinleiðis motivatión við tíðini, og tí er tað viðkomandi at spyrja, hvørjir faktorar kunnu bøta um hugburðin hjá næmingum til at læra. Sálarfrøðingar mæla til undirvísingarhættir, sum svara til kenslur og hugsanarhátt hjá næmingunum fyri at skapa beinleiðis motivatión. Sambært Ecclestone vilja granskarar vera við, at tá ið næmingar seta arbeiðið hjá sær í samband við innsats heldur enn avrik, er størri møguleiki fyri, at beinleiðis motivatión kemur burturúr, soleiðis at djúp kreativ læring verður varandi.

Sambært Ecclestone kann læring vera formlig, óformlig ella non-formlig. Formlig læring er fyriskipað og skipað av stovninum. Óformlig læring er tað mótsetta av formligari læring, til dømis tilvildarlig umbøn um hjálp. Non-formlig læring er hvørki formlig ella óformlig, til dømis eitt átak, sum næmingarnir sjálvir hava tikið stig til. Henda sundurskiljing er ein hjálp at skilja, at fólk læra nær sum helst, hvar sum helst og á ymiskan hátt.

Ecclestone ávarar ímóti løttum loysnum í formligari útbúgving við bara at venja ávísa atferð, sum ikki er verulig læring av nøkrum, ið kann brúkast. Hon mælir til hesa arbeiðsdefinitiónina av læring: ‘ein broyting í førleika ella fatan, sum ger mun, og útihýsan av informatión, sum ikki gevur eitt íkast til slíka broyting’. Læring er ein tilgongd, sum førir til konstruktivar broytingar í huganum á tí lærandi, og tað er tann lærandi sjálvur, sum stýrir hesi tilgongd.

## Intellektuell búning

Nógvir næmingar, sum ganga á miðnámi, ella sum byrja á hægri skúlum, halda, at vitan er viss, og tað, sum tú heldur, er antin rætt ella skeivt, at autoritetar (lærarar og lærubøkur) hava svarini, og sum næmingur skal ein læra seg hesi svar uttanat og endurgeva tey til royndir og próvtøkur. So hvørt sum tey fáa fleiri royndir, verða tey so við og við greið um, at vitan skal síggjast í samanhangi, og tey byrja at taka ábyrgd av at gera sínar egnu metingar, sum eru grundaðar á próvførslur, heldur enn at líta á tað, sum sokallaðir autoritetar siga. Tey, sum mennast og búnast á henda hátt, hava lært at hugsa vísindaliga. Henda tilgongd verður nevnd intellektuell, kognitiv ella epistemologisk[1] búning.

---

[1] Epistemologi er grein innan heimspeki, ið snýr seg um, hvat vitan er, eyðkenni við vitan, keldur til vitan og avmarkingar í vitan.

Tað finnast fleiri myndlar um hetta áhugaverda evnið. Av tí at teir líkjast á tann hátt, at allir ganga út frá, at næmingurin búnast intellektuelt, meðan hann ella hon er undir útbúgving, skulu vit her einans umrøða tveir av teimum: Perry-myndilin um intellektuella og etiska búning og King-Kitchener-myndilin um reflektiva meting.

## Perry-myndilin

Perry myndilin frá 1970 um intellektuella og etiska búning hevur 9 menningarstig, sum eru bólkað í 4 høvuðspunkt:

- Dualisma
    1. Dualitetur
    2. Full dualisma
- Fjølbroytni
    3. Byrjandi fjølbroytni
    4. Fult fjølbroytni
- Relativisma
    5. Relativisma
    6. Pre-commitment
- Commitment
    7. Veruligt commitment
    8. Avbjóðingar
    9. Post-commitment

William Perry vil vera við, at næmingar fara frá dualismu og uppeftir intellektuella stiganum. Í dualismu er hugburðurin til vitan rættiliga einfaldur: dualitetur merkir, at næmingurin heldur, at allir spurningar kunnu svarast, og tí er uppgávan hjá næminginum at læra tey røttu svarini. Full dualisma merkir, at allir autoritetar eru ikki samdir um alt, men summir hava rætt, og aðrir hava skeivt; tí er uppgávan hjá næminginum at læra tey røttu svarini, og gloyma tey skeivu.

Tá ið næmingurin búnast frá dualismu til fjølbroytni, gerst hann greiður um, at tvey svar upp á sama spurning kunnu vera í stríð við hvørt annað. Tí má hann sjálvur meta um, hvat hann skal halda. Í byrjandi fjølbroytni eru tvey sløg av spurningum: (1) tey, sum vit kenna svarini til, og (2) tey, sum vit ikki kenna svarini til enn. Sostatt hongur eitt sindur við av dualismu.

Tá ið næmingurin búnast til fult fjølbroytni, líkjast flestu spurningar tí seinna, men við tí muni, at kanska er eingin røtt loysn til spurningin, og tí hava øll rætt til at hava eina meining, og tað er næstan líkamikið, hvørja loysn tú velur, ella um tú velur nakra. Nógvir

næmingar kenna seg ótryggar, tá ið teir koma upp á hetta stigið, og hava hug at venda aftur til lægri stig, sum kennast tryggari.

Tá ið næmingurin kemur upp á relativismu-stigið, væntar hann, at allar møguligar loysnir mugu undirbyggjast við grundgevingum, og tað ber í sær, at tær skulu síggjast í einum samanhangi. Nakrar loysnir kunnu vera betri enn aðrar, og tá veldst um samanhang. Avbjóðingin er at meta um loysnirnar. Á stigi 6, sum nevnist pre-commitment byrjar næmingurin at síggja, hví tað er neyðugt at gera nøkur val, og at hann má sjálvur taka ábyrgd av tí, sum hann velur.

Á commitment-stigunum fer næmingurin at integrera vitan, sum hann hevur fingið frá øðrum, við persónligar royndir og við egna refleksión. Á avbjóðingar-stignum upplivir hann tvørleikar av hesum og mennir evnini at meta um ábyrgd. Henda ferðin hjá næminginum frá dualismu og upp eftir stiganum verður ofta endurtikin og kann vera á fleiri stigum samstundis, alt eftir hvat evni talan er um.

Fleiri kanningar vísa, at flestu næmingar eru á øðrum ella triðja stigi í Perry myndlinum, tá ið teir byrja á hægri útbúgving, og flestu miðnámsskúlanæmingar eru á fyrsta ella øðrum stigi. Tvær kanningar vístu, at flestu næmingar, sum byrjaðu at lesa verkfrøði, vóru á triðja stigi í Perry myndlinum, og miðal broytingin eftir 4 árum á universiteti var eitt stig, har størsta broytingin hendi tað síðsta árið. Felder og Brent halda hetta vera eitt dapurt úrslit, tí at eitt munandi tal av næmingum er ikki lyft upp á stig 5 við relativismu eftir 4 árum í hægri lestri.

## Tann reflektivi metingarmyndilin

Hesin myndilin er blivin til av gransking hjá King og Kitchener. Tær komu eftir, at tá ið einstaklingar svara spurningum, hevur svarið samband við teirra grundleggjandi fatan av vitan í sjálvari sær, og henda fatan broytist, so hvørt sum fólk koma víðari í útbúgving. Myndilin lýsir tríggjar fasur, ið eru býttar sundur í 7 stig frá einføldum mátum at fata til at svara illa struktureraðum spurningum og víðari til meira kompleksar spurningar. Hugtakið reflektiv hugsan lýsir tann hugsanarhátt, fólk nýta, tá ið tey verða konfronterað við kontroversiellar og ivasmar spurningar. Hesir spurningar eru illa struktureraðir. Tá ið spurningar kunnu verða svaraðir við størri vissu, er hinvegin talan um væl struktureraðar spurningar.

Tann reflektivi metingarmyndilin setir fokus á kontroversiell vandamál, har tað er sannur ivi um eina rætta loysn ella ta bestu loysnina. Tá ið politikarar skulu gera av, hvussu teir skulu minka um dálking í samfelagnum, og teir samstundis vilja virða búskaparlig áhugamál, hava teir ein illa struktureraðan spurning at taka støðu til. Hesir spurningar kunnu hvørki verða lýstir á ein fullfíggjaðan hátt ella verða loystir á ein fullfíggjaðan hátt.

Myndilin lýsir eina gongd í, hvussu hugsanarhátturin hjá næmingum broytist, og hvussu næmingar mennast til at undirbyggja síni sjónarmið, og hvussu teir meta um illa struktureraðar spurningar.

Í fyrstu fasu (stig 1-3) er hugsanarhátturin pre-reflektivur; næmingarnir ganga út frá, at vitan fæst við persónligari observering ella gjøgnum autoritetar, og vitanin er absolutt og viss. Á triðja stigi er vissan nakað linkað. Næmingarnir eru ikki førir fyri at skilja ímillum væl struktureraðar spurningar og illa struktureraðar spurningar.

Í aðru fasu (stig 4-5) vísa næmingar ein kvasi-reflektivan hugsanarhátt og góðtaka munin ímillum væl struktureraðar og illa struktureraðar spurningar. Á fjórða stigi hava teir tó trupult við at meta um illa struktureraðar spurningar. Á fimta stigi er næmingurin meira leysur av spurninginum í greiningum og dugir betur at halda javnvág í hugsanarhátti enn á fjórða stigi, og hann dugir eisini betur at seta vitan í samanhang.

Í triðju fasu (stig 6-7) vísa næmingar reflektiva hugsan í sínum metingum. Vitan má skiljast í sambandi við tað samanhang, sum hon er komin úr, og næmingurin strukturerar fatanina aktivt og tulkar hana við samanhangi og við grundgevingum.

Myndilin hjá King og Kitchener hevur verið nógv brúktur at kanna, hvørjum stigi næmingar eru á. Tær nýta samrøður í hesum sambandi, nevndar RJI, ið stendur fyri reflective judgment interview. Miðal fyri byrjarar á hægri lærustovnum liggur ímillum 3,23 og 4,16. Og miðal fyri lesandi á fjórða ári liggur ímillum 3,56 og 5,02. Tølini sipa til stigini í myndlinum. Samanlagt mennast lesandi frá 3,68 til 4,02 eftir 4 árum á hægri læristovni. King heldur hetta úrslit vera ræðandi – av tveimum grundum: fyri tað fyrra byggir tað á eitt stórt tal av lesandi frá nógvum lærustovnum, og er tí rættiliga álítandi; og fyri tað seinna eru flestu fjórða árs lesandi kvasi-reflektiv og avdúka sum heild ikki, at tey skilja týdningin av at undirbyggja ella føra prógv fyri tulkingum. Hesi úrslit líkjast teimum, sum kanningar eftir Perry myndlinum komu til (sí omanfyri).

## Hvussu kunnu næmingar mennast á miðnámi?

Ongar kanningar eru um intellektuella búning á føroyskum miðnámsskúlum, og tí áttu vit kanska ikki at gjørt nakra roynd at gita um tað. Hinvegin vita vit, at læringsumhvørvið á føroyskum miðnámi er fongt við karakterfiksering og av, at vit í stóran mun undirvísa eftir, at næmingurin skal til eina ávísa próvtøku; og hesi bæði fyribrigdi gera undirvísing og læring grunnar og stuttskygdar. Eisini er grund til at halda, at vit í ávísan mun undirvísa eftir bók, har næmingarnir verða uppdrignir til at halda, at bókin er ein autoritetur.

Hóast vit ongar kanningar hava at vísa á um intellektuella búning, so kunnu vit her vita, hvat vit kundu gjørt betur fyri at menna næmingin frá fólkaskúla til víðari útbúgving, sum

er aðalmálið við miðnámi. Her skulu vit ansa eftir, at avbjóðingarnar ikki blíva so stórar, at næmingurin missir mótið, og samstundis skulu vit eisini ansa eftir, at tað, sum tey læra, hevur akademiskt haldføri, soleiðis at tað, sum verður lært á miðnámi, ikki skal avlærast, tá ið tey fara at læra víðari, men kann brúkast til at byggja víðari á.

Í búskaparbreytini skulu næmingarnir til dømis læra nógvar teoriir og myndlar, sum eru ætlað sum amboð hjá fyritøkum og myndugleikum at taka avgerðir eftir. Viðhvørt kann koma fyri, at tvær teoriir at síggja til eru í stríð við hvørja aðra. Flestu næmingar vilja so hava at vita, hvør er tann rætta. Men tey, sum hava upphugsað teoriirnar, hava ikki hugsað so. Tað veldst heldur um fortreytir og umstøður, sum fyritøkan er í. Tann, sum er epistemologiskt nóg búgvin, er førur fyri at meta um, nær ein teori er brúkilig, og nær hon er vandamikil.

### Samanhang millum hugburð og búning

Tað er eitt vist samanhang ímillum djúpan hugburð til tað at læra og samanhangandi vitan í myndlunum um intellektuella menning. Í báðum førum tekur næmingurin ábyrgd av egnari læring. Felder og Brent føra fram, at eginleikar, sum føra til djúpan hugburð, skapa eisini intellektuella menning. Korrelatiónin kemur av faktorum, sum ávirka báðar variablarnar. Ein ávís broyting fer fram í intellektuellari menning í útbúgvingum, men tá ið tað kemur til hugburð til tað at læra, so er motivatiónin helst vaksandi í útbúgvingartíðini, men inn í millum fer hon upp og niður.

## Hvat kunnu teoriirnar samanumtikið brúkast til?

At býta ymiskleikar sundur í tey trý økini (læristíl, hugburð til at læra og epistemologiska búning), sum vit hava gjørt her, er ein nýtiligur máti hjá lærarum og øðrum, sum hava við undirvísing og læring at gera. At strukturera vitanina á henda hátt er eitt hent amboð hjá læraranum sum leiðara. Tilvitanin um, hvussu ymiskir læristílarnir eru ímillum næmingarnar, eigur at fáa læraran at variera undirvísingina nógv, soleiðis at allir næmingar viðhvørt fáa undirvísing á ein hátt, sum hóskar til teirra læristíl. Er lítil variatión í undirvísingini, er vandi fyri, at næmingar við ávísum læristílum verða sleptir upp á fjall.

Hugburður til tað at læra er lættari hjá læraranum at síggja og staðfesta enn læristílur. Hesa vitan kann lærari brúka til at halda motivatión viðlíka og at ávirka næming at fáa ein sunnari hugburð til at læra. Hvussu tað gerst, er helst kjarnin í góðari undirvísing. At variera undirvísing, sum nevnt omanfyri, er ein máti. Eldhugi fyri fakinum hevur ofta smittandi ávirkan á næmingar. Eitt gott læringsumhvørvi, har næmingar føla seg væl, hjálpir eisini til. At vit vísa næminginum virðing, hevur nógv at siga. Men eingin ivi má

vera um, at tað er lærarin, sum er leiðarin. Lærarin kann eisini í samrøðum og í afturmeldingum til skrivligar uppgávur ávirka hugburðin hjá næminginum til tað at læra.

Um næmingar skulu búnast intellektuelt, er alneyðugt at vit halda eina javnvág ímillum at hjálpa næminginum og at geva honum avbjóðingar. Ov nógv hjálp kann fáa næmingin at steðga upp, meðan ov stórar avbjóðingar kunnu fáa hann at halda uppat. Eitt læringsumhvørvi, ið heldur næminginum til, ger, at næmingurin kennir seg minni ótryggan í sambandi við ikki at vita. Men hóskandi avbjóðingar eggja næminginum til at víðka verandi fatan og læra at fyrihalda seg til nýggja vitan.

## Keldur

ARNOLD, J., COOPER, C., ROBERTSON, I., 1998. *Work Psychology, Understanding Human Behaviour in the Workplace,* Third edition, Harlow, England: Prentice Hall.

BAKER III, G., ROUECHE, J., GILLETT-KARAM, R., 1990. *Teaching as Leading: Profiles of Excellence in The Open-Door College,* Washington D.C.: The Community College Press.

DAHL, J., HOLM, E., RÓIN, B., 2006. *Frágreiðing um næmingafráfall á Studentaskúlanum í Hoydølum.*

ECCLESTONE, K., 2002. *Learning Autonomy in the Post-16 Education: The politics and practice of formative assessment*, London: Routledge-Falmer.

FELDER, R., BRENT, R., 2005. *Understanding Student Differences, Journal of Engineering Education*, Vol. 94, No. 1, pp. 57-72.

KING, P.M., 1992. *How Do We Know? Why Do We Believe? Liberal Education*, Vol. 78, No. 1, January/February.

# Z-ættarliðið

*Adam Renfro*

*Sólfinn Hansen týddi*

Hugtakið "Z-ættarliðið" verður vanliga nýtt um tey, ið eru fødd eftir 1990, og sum eru vaksin upp við internetinum. Tilveran hjá hesum ættarliði verður myndað av internetinum, tøkni, kríggi, yvirgangi og sosialum miðlum; teirra vitan stavar í høvuðsheitum frá internetinum, og teirra sosialu sambond við javnlíkar stava frá sosialu miðlunum. Tey hava breiða vitan og vita ofta meira enn undanfarin ættarlið, tey eru smidlig og vænta, at fyritøkur og stovnar somuleiðis eru fleksibul í sínum samskifti við tey. Eitt annað eyðkenni er, at tey hava færri fordómar og góðtaka ymiskleika í størri mun enn eldru ættarliðini.

Tá tað kemur til sosialu miðlarnar, er Z-ættarliðið altíð "on". Tað er her, tey finna og halda vinabond, vitan og undirhald, og av tí sama er støðugt elektroniskt samband sera týdningarmikið fyri tey. Tey eru ótolin, tá tað kemur til at bíða eftir svari upp á teldupostar ella eftir boðum, og eitt annað eyðkenni er, at tey eru hugtikin av samfelagsligum spurningum. Um teir sosialu miðlarnar eru tey vorðin tilvitað um eitt nú rættvísi, kríggj, fíggjarkreppur og umhvørvisspurningar.

Z-ættarliðnum dámar best miðlar, ið geva teimum høvi at interagera, og tískil hava sjónvarp og prentaðir miðlar ikki tann stóra týdningin í teirra tilveru. Somuleiðis dámar teimum best tøknieindir, ið tey kunnu hava við sær, og sum hava fleiri funkur; eindirnar skulu helst kunna taka myndir og video upp, sleppa á internetið, spæla tónleik og filmar, taka ímóti tíðindum og hava møguleika fyri at kunna viðmerkja og senda boð.

## Z-ættarliðið og merkivørur

Tey í Z-ættarliðnum eru ikki trúgv mótvegis "brands". Tey hava lyndi til at blanda alt frá klædnamerkjum til heimspekilig ástøði saman. Kortini hava tey stóra ávirkan á búskapin. Teirra metingar av vørum, "like'um" og afturmeldingum kunnu koppa marknaðarførslustrategium og enntá heilum fyritøkum, helst tí at tey brúka meiri pening, enn nakað ættarlið frammanundan teimum hevur gjørt. Samstundis eru tey meira tilvitað enn onnur um at keypa umhvørvisgóðar vørur.

## Hvussu við tí sosiala?

Tað er umráðandi fyri Z-ættarliðið altíð at hava atgeingi til vinir, dátur og undirhald. At arbeiða og útbúgva seg gera tey, tá tað liggur fyri, og tey hava hug, heldur enn at avmarka seg til ávísar klokkutíðir. Allan dagin verða tey ávirkað av myndum og øðrum úr allari

verðini, og ger hetta, at tey kenna størri ábyrgd um samfelagsviðurskifti enn onnur. Kortini hevur undirhald nógv at siga í teirra tilveru, og sæst hetta m.a. aftur í, at teirra hugur til at spæla eitt nú telduspøl fylgir teimum inn í vaksnamannalívið. Sostatt verða tey ofta løgd undir bæði als ikki at gerast vaksin og at vaksa upp ov skjótt, tí at tey eru dagliga konfronterað við nógv og til tíðir órógvandi tíðindi, og tí at tey vilja spæla og verða undirhildin, ikki minst undir útbúgvingini. Bæði útbúgving og starv skulu vera stuttlig.

Hvat foreldrunum viðvíkir, tykist Z-ættarliðið at vera tættari sínum foreldrum, enn X-ættarliðið var. Foreldur eru í minni mun lærumeistarar, tí Z-ættarliðið hevur atgongd til flestu svarini umvegis aðrar miðlar, og ofta spæla tey somu spøl, lurta eftir sama tónleiki og hyggja at somu sendingum sum foreldrini. Ein alsamt vaksandi partur av vitanini, sum Z-ættarliðið fær, fæst heima við hús umvegis elektronisku samskiftistólini. Hetta ger Z-børnini sjálvstøðug, men merkir samstundis, at sjálvsvirðingin hjá teimum er lættkeypt, tí at foreldrini hava lyndi til at rósa børnum sínum fyri teirra tøkniligu førleikar, hóast hesir førleikar eru púra natúrligir fyri tey. Teimum nýtist tískil ikki at stremba serliga nógv eftir viðurkenning. Ein annar vansi við hesum er, at Z-ættarliðið gerst kensluliga bundið at sínum talgildu siðvenjum, og tey taka atgongd til dátur fyri givna.

## Framtíðin

Væntast kann, at 65% av verandi barnaskúlanæmingunum fara at hava størv, sum ikki eru til enn, og tað vísir seg, at starvsmøguleikar eru tað, sum rúgvar upp í hugaheiminum hjá 80% av Z-ættarliðnum. Helst vilja tey arbeiða í einum professionellum og tøkniligum umhvørvi, har "hugskotsvinna" fyllir nógv. Væntast kann, at Z-ættarliðið fer burtur frá eini 40-tíma arbeiðsviku og í størri mun yvir til fríyrkis-vinnuna, har tey loysa uppgávur, ið krevja spesialiseraðar førleikar. At starvast í 30 ár á sama arbeiðsplássi hugtekur tey ikki.

Roknast kann við, at bygnaðurin á arbeiðsplássunum fer at gerast meira interaktivur, og at tey, á sama hátt sum tey eru loyal mótvegis sínum leiðara, fara at vænta, at stjórin ansar eftir teimum og verjir tey, meðan tey eru í starvi hjá sær. Hinvegin ganga tey nógv upp í fleksibilitet og føla seg ikki bundin at sínum arbeiðsgevara. Seinastu áratíggjuni hava tey sæð, hvussu fyritøkur eru farnar við foreldrum og eldru systkjum teirra gjøgnum fíggjar-kreppur, og teirra loyalitetur er sostatt ikki mótvegis arbeiðsplássinum. Tey hava lyndi til at arbeiða meira í nú'inum og leggja dent á at fáa skjót úrslit, soleiðis at tey altíð hava okkurt at vísa á. Hetta ger tey samstundis kappingarfør á arbeiðsmarknaðinum.

## Lærdómur

Av tí at Z-ættarliðið ofta verður nevnt digitala ættarliðið, halda nógvir lærarar ofta av órøttum, at tey øll eru talgildir borgarar og vita alt um vandarnar á internetinum, duga at

handfara persónligar upplýsingar online, eru tilvitað um upphavsrættindi og so framvegis. Men tað, sum tað snýr seg um fyri Z-ættarliðið, er fyrst og fremst, at tilfar skal kunna fáast til vega skjótt. Z-ættarliðið dugir tó betur enn onnur at skilja og handfara grafikk, at multitaska og at taka støðu út frá stórum mongdum av dátum.

Siðbundna skúlastovuundirvísingin samsvarar ikki væl við áhugamálini hjá Z-ættarliðnum. Teimum dámar ikki serliga væl fyrilestrar og próvtøkur, men vilja sleppa at nýta egnar mannagongdir til at finna fram til upplýsingar. Nakað einfalt kann sigast, at avbjóðingin liggur í, at næmingarnir eru digitalir, meðan lærararnir eru analogir. Serliga eldri lærarar síggja ikki nyttuna í førleikunum at handfara talgildar upplýsingar, tí at teir sjálvir ikki eru eins vanir við tøknina, sum næmingarnir eru.

Andsagnirnar koma serliga til sjóndar, tá tað kemur til virði og keldukritikk. Har eldra ættarliðið legði stóran dent á, at upplýsingar vóru rættar, leggur Z-ættarliðið størri dent á at fáa upplýsingarnar skjótt til vega, og minni á spurningar, ið krevja drúgva viðgerð. At duga at gera “snýtikotur” til spøl og at “cracka” spøl er ofta høgt í metum hjá Z-ættarliðnum, meðan útbúgvingarstovnum dámar hetta illa. Lærarar løna tí ikki, at næmingar finna sær sniðgøtur. Hesar andsagnir merkja tilsamans, at gjógvin millum tað, sum útbúgvingarstovnarnir undirvísa í, og førleikarnar, sum framtíðin fer at spyrja eftir, breiðkast. Fyri at rætta hetta upp er neyðugt at leggja størri dent á samstarv, aktiva læring og evnislagað (problembaserað) verkætlanararbeiði.

## Vandar og vansar fyri Z-ættarliðið

Heimurin hjá Z-ættarliðnum er merktur av ótryggleika. Fíggjarkreppur, kríggj, orku-kreppur og veðurlagsbroytingar fylla gerandisdagin hjá teimum, samstundis sum tey eru alsamt meira bundin at tøknini. Hetta gevur rúmd fyri nýggjum trupulleikum sum happing, stolnum samleikum, brot á upphavsrættindi, har heldur ikki myndugleikar og løgregla eru dagførd til at kunna handfara hetta nóg væl.

Onnur ættarlið mugu somuleiðis fyrihalda seg til broytiligu ella vantandi førleikarnar hjá Z-ættarliðnum til at fáast við onnur menniskju og teirra tørv á at menna nisjuførleikar í einum heimi, har útbúgvingarnar í stóran mun eru lagaðar til at vera fyri øll. Umframt alt hetta kemur so eisini spurningurin um tey, ið eru í sama aldursbólki sum ættarlið Z, men sum ikki hava atgongd til talgilda heimin, einamest av fíggjarligum orsøkum.

Adam Renfro undirvísti í enskum í skúlastovum í 10 ár, áðrenn hann byrjaði at undirvísa umvegis internetið í 1998. Í løtuni starvast hann á North Carolina Virtual Public School, ið

er næststørsti fjarlestrarskúlin í USA. Adam Renfro hevur bloggað fyri Getting Smart síðani september 2011.

Til ber at fylgja Adam Refro á Tumblr á http://adamrenfro.tumblr.com/

Á Twitter á https://twitter.com/AdamRenfro

Og tíðarrit hansara Edu-Nation kann lesast á  http://flip.it/Apupn.

# Viðtal við føroying á grønlendskum studentaskúla

Tórður Johannesarson

**Billa Sondum er úr Havn og starvast á studentaskúla í Nuuk. Hon er cand.mag. í religión og samfelagsfrøði, las við Keypmannahavnar Universitet, og hevur arbeitt á GUX-Nuuk í skjótt fimm ár. Henni dámar sera væl á skúlanum. Á skúlanum ganga umleið 450 næmingar, og umleið 50 lærarar starvast á skúlanum. Vit høvdu hetta viðtal við Billu Sondum í februar 2015.**

**Nær fingu grønlendingar fyrsta miðnámskúla?**
Fyri umleið 30 árum síðan. Studentaskúlin byrjaði smátt um smátt í Nuuk.

**Hvussu nógvir miðnámsskúlar eru í Grønlandi (tekniskir skúlar/handils-skúlar og studentaskúlar), og hvar eru hesir?**
Tríggir studentaskúlar í Aasiaat (Avannaani Ilinniarnertuunngorniarfik), Nuuk (Qeqqani Ilinniarnertuunngorniarfik) og Qaqortoq (Campus Kujalleq). Í fjør bleiv studentaskúlin í Qaqortoq  lagdur saman við handilsskúlan har. Í Sisimiut er ein meira tekniskur miðnámsskúli (Sanaartornermik Ilinniarfik). Allir fýra rópast "GUX" og hava fyrsta hálva árið í 1.g í felag – eftir tað velja næmingarnir seg inn á ymsar linjur.

**Miðnámsskúlarnir í Føroyum eru undir Mentamálaráðnum, hvussu er í Grønlandi?**
Miðnámasskúlar í Grønlandi eru undir IKIIN (Ilinniartitaanermut, Kultureqarnermut, Ilisimatusarnermut Ilageeqarnermullu Naalakkersuisoqarfik) - Departementet for Uddannelse, Kultur, Forskning og Kirke.

**Hvussu stórur partur av næmingum í 9. - 10. flokki fara umleið á miðnám í Grønlandi**?
Sambært "Naalakkersuisuts uddannelsesstrategi 2014" fóru 12% av næmingunum, ið blivu lidnir við fólkaskúlan, beinleiðis víðari á ungdómsútbúgving, 45% fóru á eftirskúla. 43% fóru ikki víðari beinanvegin. M.a. grønlendska búskaparráðið hevur víst á, at ov fá lesa víðari eftir fólkaskúlan – tey skriva í nýggjastu frágreiðing síni (Økonomisk Råds rapport 2014), at "*Særligt bekymrende er det, at omkring 62 pct. af de 16-18 årige i 2012 slet ikke var i gang med en uddannelse. Det er udtryk for en dårlig udnyttelse af det potentiale, som ungdomsårgangene repræsenterer, og det er en meget dårlig start på flertallet af de unges liv efter folkeskolen, når de ikke er kommet i gang med en uddannelse. Det er et*

*alvorligt svigt, at kommuner og selvstyret ikke har kunnet løse denne udfordring. Naalakkersuisut har ganske vist en målsætning om at reducere denne gruppe til 57 pct. i 2017 og 40 pct. i 2020. Men det må anses for at være en uambitiøs målsætning, og formandskabet skal opfordre til, at kommunerne og selvstyret tager initiativer til en betydelig styrkelse af indsatsen over for de helt unge på alle niveauer, således at en væsentligt større andel af en årgang får en uddannelse.*" Hvussu nógv, ið lesa víðari eftir 18-ára aldur, veit eg ikki – men sambært "Erhvervsgrunduddannelser og gymnasiale uddannelser 2013", Grønlands Statistik 2014, vóru næmingarnir í 2013 í miðal 20 ár, tá ið teir byrjaðu í student (tað kann vera, at HF-kenda ADK hálar talið upp). Sum heild eru næmingarnir á øllum útbúgvingum lutfalsliga gamlir sambært "Naalakkersuisuts uddannelsesstrategi 2014".

**Á hvørjum máli fer undirvísingin fram í tykkara skúla?**
Á donskum – uttan í málfakunum grønlendskum, enskum o.s.fr.

**Umleið hvussu stórur partur av lærarahópinum í grønlendskum miðnáms-skúlum eru grønlendingar?**
Mær vitandi eru ikki tøl um etnisitet hjá lærarum í Grønlandi. Men flestu eru úr Danmark, og annars grønlendingar. Eg haldi, at vit eru umleið 5 føroyingar.

**Í Føroyum eru umleið 80% av lærutilfarinum danskt. Hvussu man vera í Grønlandi?**
Mest sum alt er á donskum uttan tilfarið, ið verður brúkt í málfakunum grønlendskum, enskum o.s.fr. Men vit royna sjálvandi at brúka tilfar á grønlendskum eisini, t.d. týddar greinir parallelt (tað skal sigast, at sera nógv verður skrivað um Grønland á donskum, so tað er ikki tí, at vit bara lesa um donsk vidurskifti. Øll lóggáva leggur dent á, at undir-vísingin skal ganga út frá Grønlandi og grønlendskum viðurskiftum. Próvtøkurnar fara sum oftast fram á donskum.

**Hvussu er málsliga støðan í skúlanum? Her verður hugsað um, hvørt næmingar skilja nóg væl danskt?**
Tað er sera ymiskt, hvussu væl næmingarnir duga danskt. Summir teirra hava danskt sum móðurmál, meðan aðrir mest tosa grønlendskt – ella eysturgrønlendskt, ið er rættiliga øðrvísi. Harumframt skulu studentaskúlanæmingar læra mongu fakhugtøkini, ið mestsum eru mál í sjálvum sær. Sostatt er tað ein dupult avbjóðing – danskt og fakmál, og tað er sum sagt ymiskt, hvussu væl tað liggur fyri hjá teimum. Nógv fokus er tískil á "andet-sprogspædagogik", ið er ein av "súlunum" í nýskipanini av miðnámsútbúgvinunum, ið kom í 2012.

**Í Føroyum skalt tú í minsta lagi vera kandidatur ella master fyri at undirvísa á gymnasialum miðnámi, hvussu er í Grønlandi?**

Í Grønlandi skal man vera kandidatur og hava pedagogikum fyri at undirvísa á miðnámsútbúgving.

**Hvussu taka lærarar í Grønlandi námsfrøðiliga útbúgving? Í Føroyum koma lærarar frá Syddansk Universitet at undirvísa føroyskum miðnámslærarum. Føroyskir miðnámsskúlalærarar fara í høvuðsheitum til Danmarkar at taka verkliga partin í námsfrøði.**

Í Grønlandi er vanligt at taka pedagogikum annað árið. Pedagogikum er í fleiri pørtum – tann verkligi parturin, har man er knýttur at tveimum vegleiðarum á skúlanum (einum fakligum og einum pedagogiskum), ið hyggja eftir tímunum, eins og man eisini sjálvur hyggur at undirvísing hjá øðrum (og undirvísi flokkum hjá øðrum). Harumframt fer man eisini tvær ferðir til Danmarkar á "fak-didaktiskt" skeið saman við lærarunum, ið eru í pedagogikum í Danmark. Tann ástøðiligi parturin er, at man skal á intensivt skeið í Nuuk, har ein lærari úr Danmark undirvísir í pedagogiskum ástøði. Tað verður endað við einari bundnari uppgávu, ið man skrivar um várið, og sum man fær próvtal fyri. Pedagogikum er við at blíva endurskipað, so at man tekur bæði fakini í senn, eins og í Danmark (sjálv tók eg annað fyri og hitt eftir), og tað er sami "tilsynsførende", ið kemur úr Danmark og er við til at skriva endaliga úttalilsið (hjá mær vóru tað tvey ymisk). Úttalilsið verður skrivað av rektaranum, vegleiðarum og tí "tilsynsførende".

**Í Føroyum er fráfallið á miðnámi umleið 15-20% um árið. Hvussu er í Grønlandi?**

Í øllum Grønlandi falla uml. 40% av næmingunum frá miðnámsútbúgving. Á GUX-Nuuk falla knøpp 50% av næmingunum frá (sí rapport hjá Epinion, "Evaluering af gymnasie-reformen", 2014). Sum heild falla nógvir næmingar frá allastaðni í skúlaskipanini, sum m.a. Skatta- og Vælferðarkommissónin (2011) hevur víst á – tey tosa afturvendandi um "klart billede af et stort uddannelsesmæssigt efterslæb". Ein áhugaverd kanning av møguligum atvoldum til, hví næmingar gevast á miðnámsútbúgving í Grønlandi, kom í 2010, "Frafaldsundersøgelsen 2010" – kann viðmælast!

**Hvussu stórur partur av grønlendsku studentaskúlanæmingunum fara á universitet?**

Sambært "Naalakkersuisuts uddannelsesstrategi 2014" lósu 69% av studentunum í 2012 víðari tvey ár seinni. Akkurát, hvussu nógvir av studentunum fara á universitet, dugi eg ikki at siga – men ymisk onnur tøl um hægri útbúgvingar eru at finna á stat.gl undir "uddannelse".